TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Tekstur til**

# Fíggjarætlan

# 2009

Januar 2009

# Fororð

Setningurin, ið Tjóðveldi og Javnaðarflokkurin, settu hvør øðrum við ársbyrjan 2005, er um at verða lokin. Samgonguskjalið, ið hevur verið støðið hjá samgonguni hetta fýraára skeiðið, er lokið og einki liggur á láni.

Nú valskeiðið rennur út, kunnu vit vísa á hópin av úrslitum, øllum borgarum í kommununi at frama.

Innan trivnað og mentan er nógv hent. Ítróttur og frítíðarvirksemi hevur fingið góðar karmar, fyrst og fremst borgarum at frama, men eisini soleiðis, at altjóða tiltøk kunnu haldast. Nevnast kunnu fimleikahøllin í Gundadali og rennibreytin Tórsbreyt, ið øll kunnu brúka.

Barnaansingin er vorðin lagaligari fyri borgaran, systkinaavsláttur er settur í verk og frítíðarskúlin røkkur nú upp í 2. flokk. Fyri tey ungu er Margarinfabrikkin eitt gott tilboð, sum er víðkað við spælistaði, so Tórsgøtu leiðir okkum enn nærri hugsanini um eina mentanargøtu í býnum.

Bráðneyðugi tørvurin á ellis- og røktarplássum er bøttur og karmarnir eru munandi víðkaðir, eins og tilboðini til tey eldru. Vísindaliga nøgdsemiskanningin í kommununi staðfestir, at á hesum øki er mest at gera. Tí er hetta skeiðið skipað fyri Eldraráði at fáa eitt gott samskifti.

Komnar eru fleiri upplivingar, ólavsøkan hevur fingið nýggjan ham, jólabýur, sølutorg í Vágsbotni og spælistað í Reinsarínum. Alt eru hetta ókeypis tænastur, ið borgarin, sambært nøgdsemiskanning er fegin um.

Ferðsluvirðurskftini eru bøtt m.a. við rundkoyringum og støðugt við nullhugsjónini í huga. Samstundis er Bussleiðin útbygd og gjørd til ókeypis tænastu í allari kommununi, seinast við Skúlaleiðini afturat.

Brennistøðin lýkur altjóða krøv, umhvørvisstuðul er settur í verk, vit hava verið virkin í Agenda 21-arbeiðnum, áir eru reinsaðar og ruddingardagar eru tiknir uppaftur. Endurnýtsla er vorðin natúrligur partur í málsviðgerð og í hesum anda er Tinghúsið á Hjalla sett í gongd eins og umhvørvisvika hevur verið hildin.

Samstarvið hevur verið gott við ytstu og nýggjastu partarnar í kommununi, sum nú røkkur frá Borðuni, Kirkjubønesi og Koltursnakki til á Deild norðuri í Sundum. Í Hesti er gjørd kloakering, so einki skitið fer á sjógv, útstykking er farin í gongd í Nólsoy, har nútímans barnagarður er gjørdur, læknamiðstøð, skúli og ítróttarhøll eru bygd í Kollafirði.

Vinnumenningardeild er sett á stovn, byggimál og byggieftirlit hevur verið styrkt og heildarætlan er gjørd fyri stórari skúlabygging í kommununi. Eftir mest sum onga nýbygging á skúlaøkinum í fjórðingsøld, er nú settur sjøtul á tveir stórar skúlar, sum báðir møta krøvum, ið røkka langt inn í framtíðina.

Við hepni hevur samgongan lagt dentin á ein varligan og ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, ið setir trivnaðin hjá bæði borgarum og starvsfólkum í hásæti, m.a. við vælvirkandi kantinu í Posthúskjallaranum. Yvirskipað hevur samgongan staðið fyri umsitingarligum og politiskum opinleika, har spurningar verða skjótt og rætt avgreiddir.

Eftir lokna setu hevur samgongan í landsins stórstu kommunu nátt teim málum, sett vórðu, støðugt havandi hugsjónina um burðardygd fyri sær. Tí er tað við fragd at vit síggja næsta ár fyri okkum, árið tá Tórshavnar kommuna kann hátíðarhalda 100 ár sum fólkavald kommuna.

Heðin Mortensen
borgarstjóri

FORORÐ .... 2

SAMLAÐ YVIRLIT YVIR ÚTREIÐSLUR OG INNTØKUR .... 5

FYRITREYTIR Í FÍGGJARÆTLANINI .... 8

FYRISITINGIN .... 9

Løgdeildin .... 9
Stjórnarskrivstovan .... 9
Vinnumenningardeildin .... 9
01 Miðfyrisitingin .... 10
Snarskivan .... 10
Kunningardeildin .... 10
Fíggjardeildin .... 10
Starvsfólkadeildin .... 10
KT-deildin .... 10
02 Trivnaðarfyrisitingin .... 11
Mentamáladeildin .... 12
Barna- og ungdómsdeildin .... 12
Sosiala deild .... 12
03 Tekniska fyrisitingin .... 13
Verkætlanarstýring .... 13
Tekniska deild .... 13
Byggi- og býarskipanardeildin .... 15

TEKNISKAR VEITINGAR .... 17

11 Vegir, gøtur, kloakkir o.a. .... 17
12 Umhvørvismál .... 18
14 Vatnveitingar og gøtuljós .... 19
15 Renovatión .... 20
16 Asfalt, ferðsla og reinhald .... 21
18 Bussleiðin .... 22
19 Sløkkiliðið .... 23
38 Lendismál .... 23
82 Húsaumsitingin .... 25

SKÚLAMÁL .... 27

Fólkaskúlin .... 27
33 Felags skúlamál .... 28
31 Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, Tórshavnar Listaskúli .... 28
32 Musikkskúlin .... 29

MENTAN OG FRÍTÍÐ .... 31

34 Tórshavnar býarsavn .... 31
35 Býarbókasavnið .... 31
36 Svimjihøllin .... 32
37 Stadion .... 32
39 Ymsir studningar .... 33
64 Stuðul til feløg o.o. .... 33

BØRN OG UNG .... 34

SOSIAL- OG HEILSUMÁL .... 36

Barnaverndarøkið .... 36
41 Lækna- og heilsumál .... 36
411 Serflutningsskipan Landsins .... 37
42 Tannlæknastovan .... 37
Eldraøkið .... 38
Heimavitjunartænastan .... 38
43 Ellis- og umlættingarheimið .... 38
431 Sambýlið í Hoydølum .... 39
432 Tjarnargarður .... 39
433 Vallalíð .... 40
434 Sambýlið í Kollafirði .... 40
435 Sambýlið í Mattalág .... 40

44 Tilhaldið í Tórsgøtu ..... 41
441 Tilhaldið í Nólsoy ..... 41

**AÐRAR ÚTREIÐSLUR ..... 42**

60 Ymsar aðrar útreiðslur ..... 42
63 Útveganir ..... 42
68 Útskiftan av amboðum ..... 43
69 Nýútvegan av amboðum ..... 43

**LÁNSGJØLD ..... 45**

**ÍLØGUÆTLAN 2009 ..... 46**

**SKJAL 1: ..... 47**

Konto 39 Ymsir studningar ..... 47

**SKJAL 2: ..... 48**

Konto 60 Ymsar aðrar útreiðslur ..... 48

# Samlað yvirlit yvir útreiðslur og inntøkur

| Deild | Heiti: | Ætlan 2009 | Ætlan 2008 | Ætlan 2007 | Roknsk. 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| 01 | Miðfyrisitingin | 24.226 | 23.849 | 20.914 | 20.795 |
| 02 | Trivnaðarfyrisitingin | 9.172 | 9.137 | 7.986 | 8.045 |
| 03 | Tekniska fyrisitingin | 19.648 | 17.937 | 14.413 | 14.056 |
| 04 | KT-deildin | 6.077 | 6.084 | 4.987 | 5.018 |
| | **Fyrisiting íalt** | **59.123** | **57.007** | **48.300** | **47.915** |
| | | | | | |
| 11 | Vegir, gøtur og kloakkir v.m. | 18.273 | 18.997 | 17.828 | 14.140 |
| 12 | Umhvørvismál | 1.600 | 1.850 | 1.439 | 1.185 |
| 14 | Vatnveiting og gøtuljós | 13.547 | 13.540 | 13.181 | 12.239 |
| 15 | Renovatión | 19.238 | 19.237 | 15.805 | 18.704 |
| 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | 19.300 | 21.230 | 17.892 | 17.029 |
| 18 | Bussleiðin | 19.341 | 17.957 | 13.569 | 14.176 |
| 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | 10.152 | 9.709 | 9.063 | 9.566 |
| 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | 12.199 | 12.887 | 10.920 | 9.421 |
| | **Tekniskar veitingar íalt** | **113.650** | **115.407** | **99.697** | **96.460** |
| | | | | | |
| 20 | Skúlin í Hesti | 50 | 50 | 100 | 37 |
| 21 | Nólsoyar skúli | 560 | 526 | 449 | 453 |
| 22 | Velbastaðar skúli | 841 | 670 | 600 | 643 |
| 23 | Kaldbaks skúli | 414 | 403 | 380 | 374 |
| 24 | Kollafjarðar skúli | 2.668 | 2.673 | 1.616 | 2.207 |
| 241 | Ítróttarhøllin í Kollafirði | 500 | 500 | 0 | -221 |
| 25 | Tórshavnar kommunuskúli | 4.489 | 4.486 | 4.076 | 3.813 |
| 26 | Venjingarskúlin | 4.053 | 3.577 | 3.363 | 3.875 |
| 27 | Eysturskúlin | 4.362 | 4.189 | 4.189 | 3.777 |
| 28 | Sankta Frans skúli | 3.297 | 3.017 | 2.940 | 3.034 |
| 29 | Hoyvíkar skúli | 3.436 | 3.219 | 2.883 | 3.137 |
| 291 | Hoyvíkshøllin | 475 | 475 | 350 | 132 |
| 30 | Argja skúli | 3.589 | 3.449 | 3.283 | 3.182 |
| 31 | Kvøld -, ungdóms- og listaskúlin | 4.328 | 4.451 | 4.934 | 4.126 |
| 310 | Skúlin við Løgmannabreyt | 2.670 | 1.370 | 0 | 0 |
| 32 | Tórshavnar musikkskúli | 6.825 | 6.670 | 6.474 | 5.507 |
| 33 | Felags skúlamál | 4.457 | 4.275 | 3.020 | 4.408 |
| | **Skúlamál íalt** | **47.014** | **44.000** | **38.657** | **38.484** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| 34 | Tórshavnar býarsavn | 601 | 550 | 550 | 336 |
| 35 | Býarbókasavnið | 6.839 | 6.764 | 6.576 | 5.806 |
| 36 | Svimjihøllin | 5.743 | 5.974 | 5.572 | 5.681 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 37 | Stadion | 4.051 | 4.030 | 3.980 | 6.551 |
| 39 | Ymsir studningar | 11.860 | 9.060 | 7.353 | 7.096 |
| 64 | Stuðul til feløg o.o | 3.022 | 3.022 | 3.750 | 2.728 |
| | **Mentan og frítíð** | **32.116** | **29.400** | **27.781** | **28.198** |
| | | | | | |
| 40 | Barnavernd, eldrarøkt o.a. | 19.457 | 19.294 | 18.010 | 19.730 |
| 41 | Lækna- og heilsumál | 4.510 | 4.405 | 4.305 | 5.918 |
| 411 | Serflutningsskipanin | 395 | 380 | 325 | 511 |
| 42 | Tannlæknastovan | 10.300 | 9.535 | 9.250 | 10.066 |
| 43 | Ellis- og umlættingarheimið | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 431 | Sambýlið í Hoydølum | 670 | 640 | 555 | 678 |
| 432 | Tjarnargarður | 0 | 0 | 0 | 9 |
| 433 | Heimið í Vallalíð | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 434 | Sambýlið í Kollafirði | 590 | 655 | 555 | 657 |
| 435 | Sambýlið í Mattalág | 670 | 500 | 0 | 0 |
| 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 441 | Dagtilhaldið í Nólsoy | 0 | 0 | 0 | -101 |
| | **Sosial og heilsumál íalt** | **36.592** | **35.409** | **33.000** | **37.468** |
| | | | | | |
| | **Barnaansing íalt** | **138.966** | **136.914** | **125.502** | **122.382** |
| | | | | | |
| 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | 11.210 | 11.135 | 10.640 | 9.942 |
| 82 | Umsiting av bygningum | 42.335 | 41.200 | 39.400 | 37.725 |
| 63 | Útveganir | 5.000 | 6.409 | 5.572 | 7.170 |
| 68 | Útskiftan av amboðum | 7.000 | 6.500 | 6.500 | 15.066 |
| 69 | Nýútvegan av amboðum | 3.000 | 3.500 | 0 | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **68.545** | **68.744** | **62.112** | **69.903** |
| | | | | | |
| 66 | Reguleringskonto | 2.500 | 2.500 | 3.000 | 0 |
| | **Rakstrarútreiðslur íalt** | **498.506** | **489.381** | **438.049** | **440.810** |
| | | | | | |
| 90 | Íløgur | 145.200 | 251.800 | 150.000 | 138.990 |
| | Smábátahavn | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 303 |
| | **Rakstur og íløgur íalt** | **647.706** | **746.181** | **593.049** | **580.103** |
| | | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 61 | Rentuútreiðslur | 7.236 | 1.000 | 1.403 | 1.546 |
| 62 | Avdráttir av lánum | 1.950 | 0 | 2.296 | 78.749 |
| | **Lánsgjøld** | **9.186** | **1.000** | **3.699** | **80.295** |
| | | | | | |
| | **Útreiðslur íalt** | **656.892** | **747.181** | **596.748** | **660.398** |

# Fíggjarætlan 2009

| Deild | Heiti: | Ætlan 2009 | Ætlan 2008 | Ætlan 2007 | Roknsk. 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| 80 | Rentuinntøkur | 3.000 | 4.000 | 1.000 | 3.550 |
| 83 | Inntøkur av traðum og økjum | 3.000 | 3.000 | 2.752 | 13.266 |
| 89 | Skattainntøka | 598.796 | 583.000 | 536.133 | 580.162 |
| | At fíggja v. tøkum/framfluttum peningi | 52.096 | 152.449 | 536.133 | 580.162 |
| | | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **656.892** | **742.449** | **589.885** | **596.978** |

# Fyritreytir í fíggjarætlanini

Fíggjarætlanin er løgd soleiðis til rættis, at virksemið hjá kommununi kann halda fram á einum nøktandi støði og við somu tilboðum, sum borgarin fær nú. Hædd er í ávísan mun tikin fyri hækkandi útreiðslum til lønarhækkingar og hækkandi orkuprísir. Harumframt er lagt upp fyri nýggjum virksemi, sum er farið ella fer í gongd í 2009. Hinvegin er eisini lagt upp fyri at tálma útreiðsluvøkstrinum, og tí er roynt at halda flestu játtanirnar á sama støði sum í 2008.

# Fyrisitingin

Høvuðsendamálið við fyrisitingini er at veita býráði, borgarum og vinnulívi eina góða kommunala tænastu og at umsita tilfeingið hjá kommununi á fullgóðan og tryggan hátt.

Fyrisitingin hjá Tórshavnar kommunu er skipað í eina Miðfyrisiting, eina Trivnaðarfyrisiting og eina Tekniska fyrisiting[1]. Harafturat eru skipaðar tríggjar starvsfólkaeindir, Løgdeildin, Stjórnarskrivstovan og Vinnumenningardeildin.

Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna á kommunalu fyrisitingini um hendi, og hann stjórnar kommununi saman við kommunustjóranum, trivnaðarstjóranum, tekniska stjóranum og miðfyrisitingarstjóranum.

Leiðslan hevur ábyrgdina av, at kommunan verður væl rikin, og at lógir og reglugerðir verða hildnar. Somuleiðis skal leiðslan arbeiða fyri, at kommunan er eitt gott arbeiðspláss, har starvsfólk trívast og mennast.

Leiðslan skal virka fyri, at politisku stevnumiðini og avgerðir verða fylgd. Eisini skal leiðslan síggja til, at politiski myndugleikin fær eina munadygga tænastu frá fyrisitingini, soleiðis at avgerðir verða tiknar á einum haldgóðum grundarlagi.

Leiðslan er farin undir at arbeiða við virðum, og tað fer at seta sín dám á 2009. Endamálið er millum annað at fáa felags stýringsamboð, størri arbeiðsgleði, felags kós og betri samlag. Arbeiðið fer fram í eini tilgongd, sum byrjar í 2008 og heldur fram í 2009 og stóran part av 2010.

## Løgdeildin

Høvuðsuppgávurnar hjá Løgdeildini eru at ráðgeva stjórnini og nevndum, loysa tvørgangandi løgfrøðiligar uppgávur, bøta mannagongdir og fyrisitingarliga førleikan og hjálpa til í truplum løgfrøðiligum málum. Harafturat umsitur deildin hesi málsøki: Skattakærufyrisiting, kommunulóg og kommunustýrisskipan, fyrisitingarrættur og privatrættarlig viðurskifti.

## Stjórnarskrivstovan

Stjórnarskrivstovan virkar sum tænastueind fyri borgarstjóran, kommunustjóran, trivnaðarstjóran, tekniska stjóran og miðfyrisitingarstjóran. Harumframt hevur stjórnarskrivstovan eisini aðrar uppgávur at røkja innan fyrisiting og umboðan.

## Vinnumenningardeildin[2]

Málsøkið hjá vinnudeildini er vinnumenning og vinnustrategi. Deildin arbeiðir eisini við almennum viðurskiftum sum víðvíkja vinnuni og skal vera við til at skapa burðardyggar lokalar karmar fyri vinnuna. Deildin skal lýsa, kunna og ráðgeva um møguleikar og tænastur, sum Tórshavnar kommuna bjóðar vinnuni og arbeiða við vinnuráðgeving, serliga til íverksetarar.

[1] Allar deildir hava deildarlýsingar sum útgreina virksemi og heimildir.
[2] Játtanin til verkætlanir hjá Vinnumenningardeildini liggur á konto 60.

# 01 Miðfyrisitingin[3]

Høvuðsuppgávurnar hjá miðfyrisitingini eru:

- At ráðgeva borgarum, býráði og umsiting innan málsøkið soleiðis, at avgerðir verða tiknar á haldgóðum grundarlagi, og at umsita hesi øki
- At vera bindilið millum borgara og kommunu
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur serliga við atliti at umsiting

Deildirnar í miðfyrisitingini eru: Fíggjardeild, Starvsfólkadeild, Snarskivan, KT-deild og Kunningardeild.

## Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá teimum trimum fyrisitingunum: Miðfyrisitingini, Teknisku fyrisitingini og Trivnaðarfyrisitingini. Snarskivan tekur sær av telefonmóttøku, avgreiðslu, journal, fólkayvirliti og avgreiðir mál innan tað byggitekniska økið, barnaansing og kunning.

## Kunningardeildin

Kunningardeildin hevur ábyrgd av tíðindaflutningi hjá kommununi. Deildin ráðgevur og vegleiðir í samskiftisspurningum og skipar fyri kunning um tænastur, sum kommunan veitir borgarunum. Somuleiðis hevur deildin ábyrgd av lýsingum og kunngerðum, lýsingaátøkum, heimasíðu og heimaneti.

## Fíggjardeildin

Fíggjardeildin hevur um hendi bókhald og roknskap fyri allar deildir og stovnar hjá kommununi. Deildin samskipar arbeiðið við ársfíggjarætlanini, ársroknskapinum og ávegis roknskaparuppgerðum. Somuleiðis mennir deildin fíggjarstýringina sum leiðsluamboð og leiðslukunning og hevur um hendi innkrevjing fyri allar veitingar hjá kommununi.

## Starvsfólkadeildin

Starvsfólkadeildin hevur áyrgdina av starvsfólkaviðurskiftunum í kommununi, herundir starvsfólkapolitikkinum, starvsfólkaumsitingini, lønarútgjaldingini og HR-økinum.

Fyri at tryggja, at starvsfólk verða viðgjørd sambært galdandi politikki, lógum og reglum á økinum, mennir deildin alla tíðina forrit og vegleiðingar, ið stuðla undir viðgerðina, umframt at deildin ráðgevur leiðarum og stjórn eftir tørvi.

## KT-deildin[4]

Kt-deildin umsitur kunningartøknina hjá kommununi og skal tryggja, at hon virkar til fulnar. Tað merkir at keypa og reka teldutøkni og telefontøkni, veita innivist fyri skipanum í tryggum umhvørvi, fáa til vega og reka bæði innanhýsis og uttanhýsis

[3] Á konto 01 liggur eisini játtan til Løgdeildina, Vinnumenningardeildina, Stjórnarskrivstovuna, kommunustjóran og borgarstjóran.
[4] Játtanin til KT-deildin liggur á 04.

dátunet kommununnar. Ráðgeving, hjálp og vegleiðing eru týðandi tænastur, sum veittar verða.

Harumframt umsitur KT-deildin játtanir til ávís endamál. Í 2009 hevur KT-deildin játtan til lisensar umframt eina játtan til stór keyp av telduútbúnaði, smærri skipanum, víðkan av uttanhýsis samskiftisneti og útbygging av telefonskipan kommununnar.

### Miðfyrisitingin (uttan KT-deildin) kostar[5]:

| t.kr. | **Ætlan 2009** | **Ætlan 2008** | **Ætlan 2007** | **Roknsk. 2007** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur samantaldar | 19.371 | 18.934 | 17.273 | 16.022 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar | 5.655 | 5.715 | 4.441 | 5.630 |
| **Rakstrarútreiðslur** samantaldar | **25.026** | **24.649** | **21.714** | **21.652** |
| Inntøkur samantaldar | 800 | 800 | 800 | 857 |
| **Rakstraraútr. netto** | **24.226** | **23.849** | **20.914** | **20.795** |

### KT-deildin kostar:

| t.kr. | **Ætlan 2009** | **Ætlan 2008** | **Ætlan 2007** | **Roknsk. 2007** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur samantaldar | 3.028 | 2.878 | 2.878 | 2.990 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar | 3.349 | 3.206 | 2.109 | 2.028 |
| **Rakstrarútreiðslur** samantaldar | **6.377** | **6.084** | **4.987** | **5.018** |
| Inntøkur samantaldar | 300 | 0 | 0 | 0 |
| **Rakstraraútr. netto** | **6.077** | **6.084** | **4.987** | **5.018** |

# 02 Trivnaðarfyrisitingin

Trivnaðarfyrisitingin veitir politikarunum ráð og vegleiðing og tryggjar, at býráðs- og nevndarsamtyktir og avgerðir á trivnaðarøkinum verða settar í verk og avgreiddar á lógligum og fyrisitingarliga dyggum grundarlagi.

Trivnaðarfyrisitingin virkar fyri, at borgararnir fáa nøktandi tænastur á trivnaðarøkinum innan teir fíggjarkarmar, sum býráðið hevur samtykt.

Trivnaðarfyrisitingin umsitur stovnarnar á trivnaðarøkinum og hevur eftirlit við, at teir hava nøktandi umstøður at fyrisita á fíggjarliga skilagóðan og lógligan hátt.

Trivnaðarfyrisitingin virkar fyri, at starvsfólkini á trivnaðarøkinum hava eitt gott og mennandi arbeiðspláss.

Deildirnar í Trivnaðarfyrisitingini eru Sosiala deild, Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin.

[5] Løn til eitt starvsfólk er flutt frá Teknisku fyrisiting til Løgdeildina, tí uppgávan er flutt hartil. Harumframt eru tøl fyri 2007 flutt undir Midfyrisitingina og konto 05 Skattakærunevndin niðurløgd.

## Mentamáladeildin

Mentamáladeildin umsitur mentamál kommununar og hevur fyrisitingina av teimum stovnum, ið hoyra til økið, um hendi. Stovnarnir eru: fólkaskúlarnir, musikkskúlin, kvøld- og ungdómsskúlin, býarbókasavnið, býarsavnið, svimjihøllin, ítróttarhallirnar og stadionøkið. Deildin hevur dagligt samskifti við ítróttafeløgini og onnur feløg og einstaklingar, sum fáa ella søkja um studning frá kommununi.

Mentamáladeildin hevur listina hjá kommununi um hendi og skipar fyri, at listaprýði eru í hølum og á stovnunum hjá kommununi. Deildin skipar fyri listaframsýningum í Snarskivuni og hevur ábyrgd av Heinesens húsum, Smiðjuni í Lítluvík, Müllers Pakkhúsi. Deildin umsitur Minnisgrunn Sonnu av Skarði og Sanglegatið til minnis um Sonnu Dahl Waagstein og skipar fyri, tá ið árligu heiðurslønirnar, Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs, verða latnar.

Í 2009 fyrisitur Mentamáladeildin hátíðarhaldið í sambandi við, at Tórshavnar kommuna verður 100 ár, og samskipar í tí sambandi alla fyrireiking og tiltøk, sum skulu verða gjøgnum árið.

## Barna- og ungdómsdeildin

Barna- og ungdómsdeildin umsitur barna- og ungdómsøkið og virkar fyri politiska endamálinum við dagansingini í Tórshavnar kommunu, sum er:

- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at foreldur ekkaleys kunnu fara til arbeiðis og vita, at børnini eru í góðum hondum.
- í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í neyvum samspæli við náttúruna.
- at skapa umstøður, so at barnið fær møguleika at menna síni skapandi evni.
- at barnið fær møguleika at skapa egnar karmar og vera partur av einum felagsskapi við teimum krøvum og teirri ábyrgd, hetta ber við sær.
- at børnini fáa góðar umstøður at spæla og at kanna umheimin.
- at tryggja børnunum eitt heilsugott og stimbrandi umhvørvi bæði innan- og uttandura, hóskandi til aldur og førleika barnsins.
- at tryggja børnunum fjølbroyttar og mennandi upplivingar.

Barna- og ungdómsdeildin hevur dagligt samskifti við stovnarnar og eftirlit við, at teir hava nøktandi umstøður at fyrisita á fíggjarliga skilagóðan og lógligan hátt.

Barna- og ungdómsdeildin ger hagtøl og tørvsmetingar í sambandi við bíðilistan til barnaansing. Deildin tekur avgerð um frípláss.

Barna- og ungdómsdeildin veitir stovnunum pedagogiska ráðgeving bæði í mun til børn við serligum tørvi og í vanligum pedagogiskum spurningum. Deildin skipar fyri skeiðum og evnisdøgum og ger kunnandi tilfar til stovnarnar.

## Sosiala deild

Sosiala deild umsitur og hevur ábyrgd av barnaverndarøkinum, eldraøkinum, serflutningsskipanini, kommunulæknaviðurskiftum (sambært løgtingslóg um kommunulæknaskipan), heilsusystraskipanini (sambært løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung) og barnatannarøktini, sum fevnir um øll børn frá 0 til

16 ár.

Sosiala deild arbeiðir fyri at tryggja børnum, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan í góðari tíð, so tey fáa møguleikan at fáa tryggan uppvøkstur.

Sosiala deild veitir Eldraráðnum skrivarahjálp. Deildin er umboða í stýrinum fyri Serflutningsskipan landsins og í upptøkunevndini fyri Suðurstreym.

## Trivnaðarfyrisitingin kostar:

| t.kr. | **Ætlan 2009** | **Ætlan 2008** | **Ætlan 2007** | **Roknsk. 2007** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur samantaldar | 7.932 | 7.697 | 7.096 | 6.598 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar | 1.240 | 1.440 | 1.140 | 1.447 |
| **Rakstrarútreiðslur** samantaldar | **9.172** | **9.137** | **8.236** | **8.045** |
| Inntøkur samantaldar | 0 | 0 | 250 | 0 |
| **Rakstraraútr. Netto** | **9.172** | **9.137** | **7.986** | **8.045** |

# 03 Tekniska fyrisitingin

Høvuðsdeildirnar í teknisku fyrisitingini eru byggi- og býarskipanardeildin og tekniska deild, og eru undir leiðslu av býararkitektinum og býarverkfrøðinginum, sum hava beinleiðis tilvísing til tekniska stjóran. Harumframt er skipað ein stapseind undir tekniska stjóranum, nevnd Verkætlanarstýring.

Tekniska fyrisitingin virkar fyri, at íløgurnar hjá kommununi verða framdar í verki, eins og raksturin av kommunalu ognunum verður rikin á skilagóðan hátt.

### Verkætlanarstýring

Tekniski stjórin, saman við býarverkfrøðinginum og býararkitektinum, hava yvirskipaðu ábyrgdina av stýringini av verkætlanum, ið verða fíggjaðar av íløgum.

Til at seta í verk eina ressursustýringskipan og eina verkætlanarstýring er settur ein verkætlanarsamskipari og ein arkitektur undir tekniska stjóranum. Hesi starvsfólk skulu arbeiða við at skipa øll lið í eini prosjekttilgongd, frá byggiskrá til endaligan byggiroknskap, garantisýn o.s.fr. eftir føstum reglum og mannagongdum galdandi fyri allar kommunalar byggiverkætlanir.

### Tekniska deild

Tekniska deild er saman við byggi- og býarplansdeildini tekniska fyrisitingin í kommununi.

Teknisk deild, undir leiðslu av býarverkfrøðinginum, hevur ábyrgdina av, at arbeiðið á

tekniska økinum hjá kommununi verður umsitið innan fyri tær fíggjarligu játtanir, ið býráðið ásetur.

Undir Teknisku deild eru 3 deildir. Deildirnar eru Plan- og rakstrardeildin, Lendisdeildin og Heilsu- og umhvørvisdeildin

Tekniska deild hevur ábyrgdina av, at býráðs- og nevndarsamtyktir innan virkisøkið hjá deildini verða framdar í verki á ein nøktandi fyrisitingarligan hátt.

### *Plan- og rakstrardeildin:*

Plan- og rakstrardeildin, undir leiðslu av einum deildarleiðara, umsitur ferðsluplanlegging, ferðslutrygd, kollektivu ferðsluna, skúlabarnakoyringina og onnur ferðslumál, herundir vegir o.a. Somuleiðis umsitur deildin rakstraruppgávur innan tekniskar kommunalar veitingar, so sum vatn, kloakkir, gøtuljós o.tíl.. eins og deildin hevur um hendi samskipan við aðrar eksternar veitingar, so sum fjarhita, el, telefon o.a.

Entreprenørdeildirnar sum Plan- og rakstrardeildin hevur rakstrarábyrgd av eru:

- veg- og kloakkdeildin – herundir yvirflatuvatn /yvirflatuvatnstrupulleikar
- veg- asfaltdeildin, ið tekur sær av vetrartænastuni, reinhaldinum og asfaltarbeiði, herundir vegaavmerking/vegastrikur og ferðslumerking.
- gøtuljósdeildin, sum tekur sær av vanliga viðlíkahaldinum av gøtuljósum í kommununi.

Deildin umsitur eisini smærri verkætlanir innan sítt virkisøkið, fíggjaðar av íløgum, og hevur umsiting og eftirlit við útlisiteraðum uppgávum, sum t.d. Bussleiðini og skúlabarnakoyringini.

Deildin hevur eisini eftirlit við uppgávum á sínum umsitingarøki og samstarvar og veitir tekniska ráðgeving innanhýsis í kommunalu fyrisitingini til aðrar deildir, um t.d. byggimál, umhvørvismál o.s.fr.

### *Heilsu- og umhvørvisdeildin:*

Heilsu og umhvørvisdeildin umsitur øll heilsu- umhvørvismál. Virkisøkið hjá deildini fevnir um náttúru- og umhvørvisumsiting, umhvørvisgóðkenningar, umhvørvisdálking og um vatnveiting og vatngóðsku.

Deildin umsitur eisini smærri verkætlanir innan sítt virkisøkið, fíggjaðar av íløgum, og hevur umsiting og eftirlit við útlisiteraðum uppgávum, sum t.d. ruskinnsavningini.

Deildin hevur eisini eftirlit við uppgávum og stovnum á sínum umsitingarøki, og samstarvar og veitir ráðgeving innan heilsu- og umhvørvismál, innanhýsis í kommunalu fyrisitingini til aðrar deildir.

Entreprenørdeildin og stovnar, sum Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur rakstrarábyrgd av, eru:

- Vatndeildin, sum tekur sær av vanliga viðlíkahaldinum av vatnveitingini í kommununi.
- Brennistøðin, sum tekur sær av ruskinnsavning og ruskhandfaring í kommununi, eins og av tyrvingarplássum.

### *Lendisdeildin:*

Lendisdeildin umsitur lendisplanlegging, matrikulmál, húsanummur, gøtu- og staðarnøvn, gøtur, frílendi og almennar urtagarðar, kirkjugarðar, o.s.fr. Lendisdeildin umsitur eisini kortskipan kommununar (FDS). Somuleiðis umsitur deildin rakstraruppgávur innan sítt virkisøkið, so sum røktaruppgávur, fríðkan av býnum, hundaeftirlit o.a., ansingaruppgávur, rottutýning o.tíl.

Deildin hevur eisini eftirlit við uppgávum á sínum umsitingarøki, sosum frílendis-, traða- og jarðareftirlit, hegn- og vatnsýnið, almenn spælipláss og samstarvar og veitir ráðgeving innan lendismál, innanhýsis í kommunalu fyrisitingini og til aðrar deildir.

Deildin umsitur eisini smáar verkætlanir innan sítt virkisøkið, fíggjaðar av íløgum, og hevur umsiting og eftirlit við útlisiteraðum uppgávum, sum t.d. ruskinnsavningini.

## Byggi- og býarskipanardeildin

Byggi- og býarskipanardeildin er, saman við teknisku deild, tekniska fyrisitingin í kommununi.

Byggi- og býarskipanardeildin, undir leiðslu av býararkitektinum, hevur ábyrgdina av allari býarskipan, byggimálsviðgerð og umsiting av øllum bygningunum hjá kommununi, innan tær fíggjarligu játtanir, ið býráðið samtykkir.

Undir Byggi- og býarskipanardeildini eru 3 deildir. Deildirnar eru Býarskipanardeildin, Byggimálsdeildin og Húsaumsitingin.

Byggi- og býarskipanardeildin hevur ábyrgdina av, at býráðs- og nevndarsamtyktir innan virkisøkið hjá deildini verða framdar í verki á ein nøktandi fyrisitingarligan hátt.

### *Býarskipanardeildin:*

Býarskipanardeildin, undir leiðslu av einum deildarleiðara, umsitur og ger uppskot til alla býarskipan í kommununi. Deildin umsitur eisini arbeiðið við heildarætlanini, býaratlas, bygningsfriðing og varðveiting. Deildin skal somuleiðis orða ein politikk fyri byggilist fyri kommununa. Harumframt vegleiðir deildin privatum útstykkjarum og ansar eftir, at verkætlanir teirra, ikki eru í andsøgn við samlaðu býarskipanina.

Deildin umsitur eisini smáar verkætlanir innan sítt virkisøkið, fíggjaðar av íløgum, og hevur umsiting og eftirlit við útlisiteraðum verkætlanum.

Deildin hevur eisini eftirlit við uppgávum á sínum umsitingarøki og samstarvar og veitir býarskipanarliga ráðgeving innanhýsis í kommunalu fyrisitingini til aðrar deildir o.o.

### *Byggimálsdeildin:*

Byggimálsdeildin, undir leiðslu av einum deildarleiðara, umsitur alla viðgerð av umsóknum um byggiloyvir, útstykkingarætlanir o.tíl. byggiætlanir. Deildin hevur eisini byggieftirlit um hendi og tryggjar, at bygt verður samsvarandi givnum loyvum og samsvarandi almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu ella serstøkum byggisamtyktum, og skrivar út byggiváttanir. Somuleiðis vegleiðir deildin borgarum viðv. byggiumsóknum o.a.

Deildin hevur eisini eftirlit við uppgávum á sínum umsitingarøki og samstarvar og

veitir byggimálsliga ráðgeving innanhýsis í kommunalu fyrisitingini til aðrar deildir o.o.

***Húsaumsitingin:***
Húsaumsitingin, undir leiðslu av einum deildarleiðara, umsitur størsta partin av kommunalu bygningunum, og leggur fíggjarætlan fyri at gera ábøtur, viðlíkahald og umvælingar av hesum. Deildin umsitur eisini allar húsavørðar hjá kommununi, við onkrum einstøkum undantøkum.

Deildin umsitur eisini smærri verkætlanir innan sítt virkisøkið, fíggjaðar av íløgum, og hevur umsiting og eftirlit við útlisiteraðum verkætlanum.

Deildin hevur eisini eftirlit við uppgávum á sínum umsitingarøki, og samstarvar og veitir ráðgeving innanhýsis í kommunalu fyrisitingini til aðrar deildir o.o.

## Tekniska fyrisitingin kostar:

| t.kr. | **Ætlan 2009** | **Ætlan 2008** | **Ætlan 2007** | **Roknsk. 2007** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur samantaldar | 19.611 | 17.840 | 13.260 | 12.467 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar | 3.400 | 3.460 | 2.079 | 2.599 |
| **Rakstrarútreiðslur** samantaldar | **23.011** | **21.300** | **15.339** | **15.066** |
| Inntøkur samantaldar | 3.363 | 3.363 | 926 | 1.010 |
| **Rakstaraútr. netto** | **19.648** | **17.937** | **14.413** | **14.056** |

# Tekniskar veitingar

## 11 Vegir, gøtur, kloakkir o.a.

Vega- og kloakkdeildin umsitur nýgerð og dagligt viðlíkahald av øllum høvuðskloakkum við pumpubrunnum og reinsiverkum og viðlíkahald av kommunalum vegum.

Endamálið er at tryggja borgarunum neyðuga reinførið, so umhvørvið ikki verður dálkað. Neyðugt er at umvæla ella skifta allar tær gomlu kloakkirnar út. Eisini er neyðugt at tryggja borgarunum neyðugar flutningsmøguleikar á ferðslutryggum kommunalum vegum.

Eins og undanfarin ár viðger tekniska deild, saman við øðrum leidningseigarum og øðrum deildum hjá Tórshavnar kommunu, hvørji felags arbeiði skulu verða gjørd í 2009. Út frá hesum er arbeiðslisti gjørdur, og kostnaðarmeting gjørd fyri hvørt ætlað stórt anleggsarbeiði. Arbeiðslistin er tvíbýttur – stór arbeiði verða fíggjað sum íløgur, og smá arbeiði verða fíggjað av rakstri.

Arbeitt verður miðvíst við at fáa skjalprógvað liðugt arbeiði, soleiðis at til ber at eftirmeta kostnaðarstøðið

Stór arbeiði, ið kommunan hevur sett sær fyri at fara undir í 2009, fíggjað av rakstri, eru hesi:

Vegaarbeiði:

- Íslandsvegur
- Sundsvegur – grótgarðar
- Vendi- og p-pláss við Sandá
- Reynstún
- Vardu íbúðirnar við Stoffalág
- Tungugøta
- Rættargøta
- Nólsoy í samband við nýggja útstykking
- Hestur (kirkjugarðsvegur)
- Velbastað/Kirkjubøur
- í Geilini , Kirkjubøur - liðugtgerð til asfaltering

Kloakkarbeiði:

- Kloakk í Eysturbýnum – raðhúsini
- Kloakkir í Kollafirði
- Reynstún
- Tungugøta
- Kloakkútlop út á sjógv
- Sornhúsgøta – Gripsvegur
- Velbastað/Kirkjubøur
- Umvælingar av ver. Reinsiverkum
- Tjarnardeild, Tjarnarlág
- Hamarsgøta
- Slættalíð-Skrivaragøta-Vallalíð
- Kloakk í Torfinnsgøtu

Fyri at fáa bøtt um tænastustøðið hjá borgarum verður eisini arbeitt fram ímóti at fáa sett arbeiðsfólk burturav at taka sær av kloakk-TV, hjálpa arbeiðsformonnum og starvsfólki í umsitingini at taka sær av uppgávum, har tað leikar á, t.d. tá ið talan er um kærur frá borgarum um trupulleikar við yvirflatuvatni o.ø.

### Vegir, gøtur og kloakkir o.a. kosta:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknis. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *2.838* | *2.362* | *2.200* | *1.873* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *15.535* | *16.735* | *15.828* | *12.397* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***18.373*** | ***19.097*** | ***18.028*** | ***14.270*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *100* | *100* | *200* | *130* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***18.273*** | ***18.997*** | ***17.828*** | ***14.140*** |

# 12 Umhvørvismál

Heilsu- og umhvørvisdeildin umsitur ásettu lógir og reglur fyri heilsu- og umhvørvisøkið. Høvuðsendamálið hjá deildini er at fyribyrgja og minka luft-, ljóð-, vatn- og jarðardálking; fyribyrgja at dálkað verður við burturkasti og skipa fyri endurnýtslu. At miða eftir, at Tórshavnar kommuna verður ein burðardygg kommuna.

Deildin hevur eftirlit við virksemi, sum dálkar, í kommununi, av svimjihyljum, sum ikki eru kommunalir, spillivatnsleiðingum, reinsiverkum, kirkjugørðum og hvalvágum. Deildin skipar upprudding í sambandi við oljudálkingar, og somuleiðis tekur deildin sær av, at órudd og burturkast ikki liggur og rekst á almennum og privatum økjum.

Heilsu- og umhvørvisdeildin gevur kommunalum eindum í umhvørvismálum ráð, millum annað Kommunalu Brennistøðini og er við at menna góðsku og eftirlitsskipanir á vatnverkunum. Harumframt kannar heilsu- og umhvørvisdeildin dálking í áunum og fram við sjóarmálanum m.a. á Havnarvág.

Deildin hevur um hendi at viðmæla dansi-, skeinki- og matstovuloyvi og hevur eftirlit við matstøðunum í kommununi.

Eisini skipar deildin fyri kunnandi tiltøkum fyri borgaran, millum annað umhvørvisviku. Hetta verður gjørt við tí í hyggju at fyribyrgja at býurin verður dálkaður.

### Umhvørvismál kosta:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknis. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***1.600*** | ***1.850*** | ***1.439*** | ***1.190*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *0* | *0* | *0* | *5* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***1.600*** | ***1.850*** | ***1.439*** | ***1.185*** |

# 14 Vatnveitingar og gøtuljós

Vatnveitingar og gøtuljós eru fyri ein stóran part rakstraruppgávur, sum hava ligið í fyrisitingini í nógv ár. Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar á tekniska økinum er ætlanin at umskipað tað soleiðis, at fyrisitingarligi parturin viðv. vatnveitingum fer at verða undir Heilsu- og umhvørvisdeildini og gøtuljósini undir Plan- og rakstrardeildini. Farið verður undir hesa umskipan í 2009.

Sum nú er, umsitur Tekniska deild nýgerð og dagligt viðlíkahald av vatnverkunum í kommununi, sum eru bygningar, reinsiverk, goymslubrunnar, ventil- og reduktiónsstøðir, pumpustøðir, vatnkanningar og leiðingar. Høvuðsuppgávan er at tryggja borgarunum neyðugu vatnnøgdina, at vatnið lýkur tey krøv, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setur, og at vatntrýstið er nøktandi.

Tekniska deild hevur eisini ábyrgd av seta upp og halda gøtuljósini, el-mátarar, býtisskáp, ljósmastrar, ferðsluljós og leidningar. Høvuðsuppgávan er at tryggja at gøtuljóskervið virkar og at nýggjar ljósmastrar í smb. við útstykkingar og vegagerð verða settar upp.

Eins og gjørt verður fyri vegir og kloakkir verður gjørdur arbeiðslisti við kostnaðarmeting fyri ymisk vatnarbeiði, ið umsitingin hevur sett sær fyri at røkka í 2009.

Hildið verður fram við ætlanini at fáa nýggja vatnbyrging í Kollafirði, nýtt reinsiverk í Havnardali og at útbyggja alarm- og eftirlitsskipanina.

Arbeitt verður eisini fram ímóti at góðskutryggja borgarunum reinari vatn.

Arbeiðið at fjarstýra gøtuljósunum heldur fram.

## Vatnveitingar og gøtuljós kosta:

| ***t.kr.*** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknis. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *5.620* | *4.773* | *4.710* | *4.656* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *8.277* | *9.167* | *8.971* | *7.917* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***13.897*** | ***13.940*** | ***13.681*** | ***12.573*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *350* | *400* | *500* | *334* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***13.547*** | ***13.540*** | ***13.181*** | ***12.239*** |

***Lyklatøl:***

| | ***2009*** | ***2008*** | ***2007*** | ***2006*** |
|---|---|---|---|---|
| *Vatngoymslur* | *1,4 mill. M³* | *1,4 mill. m³* | *1,4 mill. m³* | *1,4 mill.m³* |
| *Vatnnýtsla um dagin* | *14.000 m³* | *14.000 m³* | *14.000 m³* | *14.000 m³* |
| *Tal av gøtuljósum* | *5.800* | *5.700* | *5.600* | *5.600* |
| *Streymnýtsla* | *2.180MWh* | *2.170 MWh* | *2.150 MWh* | *2.150 MWh* |

# 15 Renovatión

Kommunala Brennistøðin skal virka fyri, at:

- Tryggja, at alt burturkast, ið verður framleitt í kommununi, verður fyribeint á ein heilsu- og umhvørvisliga tryggan hátt
- Veita øllum í kommununi eina góða tænastu og vegleiðing, so at alt burturkast kemur til høldar og verður rætt viðfarið

Umframt at halda fram at menna fyrisitingarliga partin av virkseminum, m.a. skrásetingar, skjalfestingar, hagtøl, kunning og upplýsing og framhaldandi at menna ISO 14001 umhvørvisstýriskipan, hevur Kommunala Brennistøðin sett sær fyri í 2009

- at bjóða ruskinnsavningina út og fáa nýggjan sáttmála settan í gildi frá 1. januar 2010
- at taka í nýtslu brúgvavekt til burturkast
- at taka í nýtslu elektroniska skrásetinga- og hagtalskipan til burturkast
- at seta í verk viðlíkahaldsstýriskipan
- fáa sett í gildi reglugerð um vinnuburturkast.

Kommunala Brennistøðin er sett saman av 5 eindum: Brennistøðini, Endurnýtsluni, Jarnplássinum, Tyrvingarplássinum og Tangatømingini. Umframt nevndu eindir er fyrisiting, ið m.a. varðar av ruskinnsavningini.

**Brennistøðin**

Brennistøðin brennur burturkast, ið er skikkað at brenna, og veitir Fjarhitafelagnum avlopsorku. Ilska frá brenningini verður flutt í Húsahagan at tyrva og roykburturkast (avlopsevni frá roykreinsi) verður flutt á goymslu í Hvalvík, haðan tað verður útflutt til endaliga burturbeining á Langøya í Noregi.

Arbeitt verður við at optimera brenning, roykreinsing og útlátsmátingar, nú ovnurin er umbygdur við nýggjum filtri, mátiútgerð og stýriskipanum. Í 2009 eigur bygningurin at verða umvældur innan, t.e. matsstova, toilett og gongd, og gjørd verður ein støðumeting av bygninginum sum heild, serliga av tekju, vindeygum og útveggjum. Eisini skal støðu verða tikin til, um ketilin, ið nú virkar, skal verða umvældur ella útskiftur.

**Endurnýtslan**

Endurnýtslan tekur ímóti burturkasti frá privatum og vinnuni og skipar fyri, at burturkastið verður sent til rætta viðgerðarstað, innan- og uttanlands.

Í 2009 verður hildið fram at bøta skiljingina á Endurnýtsluni við betri eftirliti og meira upplýsing til viðskiftafólk. Eisini verður arbeitt fyri at bøta papp- og pappírs-endurnýtsluna frá virkjum.

**Jarnplássið**

Jarnplássið tekur ímóti, viðger, goymir og avskipar jarn- og metalburturkast umframt dekk til endurnýtslu. Jarnplássið stendur eisini fyri umhvørvisviðgerð av bilvrakum. Harumframt verður maskina á Jarnplássinum leigað út at lossa salt, mjøl o.a.

Í 2009 verður hildið fram at gera uttandura økið liðugt, serliga frárenningar og asfaltering.

**Tyrvingarplássið**

Tyrvingarplássið tekur ímóti mold, gróti og blandaðum avgrevstri. Plássið skipar fyri

endurnýtslu og moldsølu. Harumframt verður tilfar, sum ikki er eldført, umframt ilska og flogøska frá Brennistøðini tyrvd á økinum. Nýtt tyrvingarpláss verður projekterað í 2009.

**Tangatøming**
Tangatøming fatar um arbeiðið at tøma rottangar, reinsiverk, feittskiljarar, sandfangarar og oljuskiljarar. Tænastan fatar eisini um arbeiðið at lata upp og reinsa kommunalar kloakkir, og privatar kloakkir fyri gjald. Tangatømingin skipar harumframt fyri at savna og flyta dálkaða olju og oljudálkað vatn frá virkjum og skipum.

Í 2009 er ætlanin at útvega ein rottangabil afturat og at byggja og taka í nýtslu nýtt rottangapláss á Glyvursnesi.

### Renovatión kostar:

| *t.kr.* | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknis. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *11.237* | *10.300* | *8.585* | *10.012* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *23.962* | *24.667* | *21.300* | *31.063* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***35.199*** | ***34.967*** | ***29.885*** | ***41.075*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *15.961* | *15.730* | *14.080* | *22.371* |
| ***Rakstaraútr. Netto*** | ***19.238*** | ***19.237*** | ***15.805*** | ***18.704*** |

# 16 Asfalt, ferðsla og reinhald

Deildin fyri asfalt, ferðslu og reinhald hevur um hendi asfaltering, striking, viðlíkahald, vetrartænastu, umframt dagliga reinhaldið av almennum vegum, p-plássum og áum.

Deildin skal tryggja borgarunum neyðuga reinhaldið í kommununi, so at umhvørvið ikki verður dálkað. Miðað verður framhaldandi eftir at fáa lækkað kostnaðarstøðið fyri viðlíkahaldsarbeiðið og at arbeiða fram ímóti at fáa gjørd asfaltarbeiði at halda longur. Somuleiðis at tryggja øllum neyðugar og tryggar flutningsmøguleikar á kommunala veganetinum.

Deildin arbeiðir eftir teirri asfaltætlan, sum á hvørjum ári verður løgd fyri politiska nevnd. Eins og miðað hevur verið í undanfarnum árum, verður størri dentur lagdur á at asfaltera gongubreytir. Tó so – best hevði verið, um gongubreytarkantarnir vóru betri enn, teir eru í dag. Teir eru ov ofta slitnir og brotnaðir.

## Asfalt, ferðsla, reinhald og vetratænasta kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknis. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *846* | *820* | *450* | *876* |
| *Asfaltering* | *7.000* | *8.000* | *7.800* | *7.403* |
| *Ferðsla* | *2.748* | *3.000* | *2.500* | *2.148* |
| *Reinhald* | *3.844* | *4.070* | *3.392* | *3.392* |
| *Kavarudding* | *1.532* | *1.550* | *1.550* | *1.324* |
| *Ums. og umv. av maskinum* | *1.050* | *1.200* | *1.000* | *951* |
| *Ums. og umv. av bilum* | *1.200* | *1.200* | *1.000* | *1.015* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *1.340* | *1.590* | *400* | *761* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***19.560*** | ***21.430*** | ***18.092*** | ***17.870*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *260* | *200* | *200* | *841* |
| ***Rakstaraútr. Netto*** | ***19.300*** | ***21.230*** | ***17.892*** | ***17.029*** |

***Lyklatøl:***

| | |
|---|---|
| *Vegir í Tórshavnar kommunu* | *Uml.166 km* |
| *Gongubreytir* | *Uml. 200km* |
| *Útlagdar asfaltnøgdir* | *7.000 ton.* |
| *....herav á koyribreytir* | *45.000m2* |
| *....herav á gongubreytir* | *12.500m2* |
| | |
| *Tal av inntøkum* | *165* |
| *Tal av vegbrunnum* | *Uml. 5000* |
| *Tal av ruskíløtum* | *uml. 190* |
| *Tilfar til striking nýtt pr. ár* | *22tons* |

# 18 Bussleiðin

Tekniska deild hevur dagliga eftirlitið við bussleiðini. Endamálið við játtanini er at hava eina vælvirkandi bussleið, sum røkkur flest møguligum borgarum, og at bøta tænastugrundarlagið.

Arbeiðið at reka leiðirnar er latið tveimum arbeiðstakarum. P/F Mouritsens Bussar reka busskoyringina í býnum, og Sp/f Gundurs Bussar reka leiðirnar millum Havnina, Kollafjørð og Kaldbak.

Harumframt reka sp/f Bussferðir partar av skúlabarnakoyringini fyri kommununa á leiðini til Kirkjubøar og Velbastaðar.

Fyrireikingar skulu gerast til nýtt útbjóðingartilfar í sambandi við, at sáttmálarnir ganga út í fyrru hálvu í 2010.

Játtanin til skúlabarnakoyring er flutt frá 33 Felags skúlamál til hesa kontu.

## Bussleiðin kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *538* | *370* | *100* | *112* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *18.803* | *17.587* | *13.469* | *14.062* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***19.341*** | ***17.957*** | ***13.569*** | ***14.174*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *0* | *0* | *0* | *-2* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***19.341*** | ***17.957*** | ***13.569*** | ***14.176*** |

# 19 Sløkkiliðið

Sløkkiliðið og verkstaðið veita tænastur sum eldsløkking og kavarar til druknivanlukkur, umhvørvisóhapp, ferðsluvanlukkur og bjarging í sambandi við storm- og vatnskaðar. Aðrar uppgávur eru at koyra rørslutarnað, at halda alla sløkkiútgerðina og sløkkikranarnar í kommununi, skorsteinseftirlit og akfarsflutning.
Verkstaður er at umvæla og halda øll akfør og allar maskinur hjá kommununi.
Eisini er smiðja, ið ger rekkverk og skeltihaldarar til alla kommununa.

Sløkkiliðið arbeiðir við brunatekniskari byggimálsviðgerð at fáa bygningar so brunatryggar sum til ber og at fyribyrgja, at eldur og óhapp henda av ósketni ella óvitan. Hetta kann gerast við javnt at upplýsa. Harafturat at vera best møguliga tilbúgvin við samdøgursmannaðum vaktarsentrali og við at geva manningini so góðan førleika sum gjørligt gjøgnum ymisk skeið.

## Sløkkiliðið kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *10.000* | *9.549* | *9.218* | *9.089* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *2.822* | *2.822* | *2.663* | *4.193* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***12.822*** | ***12.371*** | ***11.881*** | ***13.282*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *2.670* | *2.662* | *2.818* | *3.716* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***10.152*** | ***9.709*** | ***9.063*** | ***9.566*** |

# 38 Lendismál

Lendisdeildin umsitur og skipar fyri at røkja kommunal frílendi, náttúruøki, áir og fjøru, viðarlundir, kirkjugarðar, grasagarðar, trø og runnar, býarhegn, tjaldingarpláss, benkur og grótgarðar. Deildin ger og heldur lendisgøtur, vegleiðir eigarafeløg, hvussu spælipláss og uttanumøki verða skipað, aktar, tekur upp dýr, ið ganga leys, og týnir skaðadýr.

Deildin umsitur og hevur eftirlit við traðunum hjá kommununi. Harumframt stendur deildin fyri eftirliti, skráseting, projektering og nýgerð á sínum virkisøki.

Høvuðsuppgávan er at skapa, menna og røkja tað, ið nevnt er omanfyri, við gróðurseting og vistfrøðiliga virðiligum átøkum, at fríðka um, gera lendisgøtur og gera borgaranna fríluftslív hugaligari innan fyri tillutaðar fíggjarkarmar. Stuðla og ráðgeva einstaklingum og eigarafeløgum at skapa eitt vakurt og gróðrarríkt umhvørvi fyri fríluftslív, frítíðar- og náttúruupplivingar og kunna um lógir og reglur í hesum sambandi.

Sambært broytingar í bygnaðinum fyri teknisku umsiting, skal FDS-skipanin í framtíðini vera hjá Lendisdeildini.

Í 2009 er hetta ætlanin:

1. fleiri lendisgøtur
2. nýtt hús og pláss til lendisdeildina er avgrivið
3. regluligt viðlíkahald av graslíkisvøllum
4. fríðka um dungan í Kollafjarðardali
5. meira røkt og planting á kommunalum fríøkjum
6. talgilt gravyvirlit í kirkjugørðunum
7. velta og drena í viðarlundini í Marknagili
8. staðseta nýtt tjaldinarpláss
9. staðseta nýggjan kirkjugarð í Hoyvík
10. staðseta nýggjan kirkjugarð í Kaldbak
11. fáa uppstigað FDS-skipanina
12. samstarv við eigarafeløg um planting
13. korttilfar og kunning um gøtur o.a.
14. lendisgøtubrúgv um Sandá
15. gera bygdahegnið í Nólsoy liðugt

## Býarfríðkan kostar:

| *t.kr.* | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *5.402* | *5.610* | *3.473* | *4.244* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *6.800* | *7.280* | *7.450* | *5.180* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***12.202*** | ***12.890*** | ***10.923*** | ***9.424*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *3* | *3* | *3* | *3* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***12.199*** | ***12.887*** | ***10.920*** | ***9.421*** |

***Lyklatøl - Býarfríðkan:***

| | ***2008*** | ***2007*** | ***2006*** | ***2005*** |
|---|---|---|---|---|
| ***Urta- og grasagarðar*** | *127* | *125* | *125* | *121* |
| ***Kirkjugarðar*** | *10* | *10* | *10* | *7* |
| ***Jarðarferðir*** | *125* | *122* | *130* | *120* |
| ***Gøtur km.*** | *23* | *21* | *20* | *20* |
| ***Rottueitur kg.*** | *124* | *400* | *700* | *440* |
| ***Viðarlundir*** | *6* | *6* | *6* | *6* |
| ***Hegn km.*** | *30* | *28* | *28* | *28* |
| ***Djóraupptøkur og vespur*** | *210* | *200* | *200* | *190* |

# 82 Húsaumsitingin[6]

Húsaumsitingin umsitur størsta partin av kommunalu bygningunum og leggur fíggjarætlan fyri at gera ábøtur, viðlíkahald og umvælingar av teimum. Eisini umsitur Húsaumsitingin størri dagføringar av bygningum. Húsaumsitingin skipar fyri, at bygningarnir hjá kommununi verða røktir og umvældir soleiðis, at teir eru í góðum standi og lúka krøvini frá myndugleikunum til brunatrygd og arbeiðsumhvørvi. Deildin hevur eisini um hendi tryggingarviðurskifti viðv. teimum bygningum, ið deildin hevur ábyrgd av. Deildin umsitur eisini flestu húsavørðarnar hjá kommununi við onkrum einstøkum undantøkum.

Fíggjarætlanin er fyri komandi ár gjørd fyri 129 bygningar. Teir eru skúlar, frítíðarskúlar, býlingshús, dagstovnar, røktar- og ellisheim, leiguíbúðir, svimjihallir, fimleikarhallir, læknahølir, bygningar til umsiting, móttøkur o.a. umframt aðrar bygningar til ung og eldri. Eisini eru tveir friðaðir bygningar, Pæsastova og Hornahúsini.

Umframt hesar bygningar eru sjálvsognarstovnar, høli til frítíðarskúlan, útibarnagarður, kampingplássið, stadionøkið, og bygningar, sum tekniska deild og Tórshavnar Havn umsita. Húsaumsitingin er eisini við til at umsita nakrar av omanfyri nevndu bygningum.

Húsaumsitingin ger útbjóðingartilfar ella fær tað gjørt av ráðgevum, og bjóðar arbeiðir út til arbeiðstakarar. Onkuntið verða arbeiði gjørd uppá rokning, um talan er um smærri arbeiði, ella aðrar umstøður gera seg galdandi.

Deildin hevur eftirlit við arbeiðum og hevur javnan samskifti við leiðarar á teimum ymsu stovnunum um viðurskifti viðv. bygningunum.

Tá talan er um skúla-/undirvísingarbygningar hevur nógv av virkseminum snúð seg um dagføringar og umvælingar. Tað er komið væl áleiðis á nøkrum skúlum. Hetta er oftast rættuliga peningakrevjandi arbeiði.

Bygningar til mentunarlig, frítíðar- og ítróttaendamál fevna m.a. um størri bygningar, so sum ítróttarhallir og felagshús. Verandi ítróttarhallir í kommununi verða nógv nýttar, og fitt av viðlíkahaldsarbeiði stendst av hesum. Eisini eru einstakir bygningar gamlir, og krevja munandi ábøtur og dagføringar.

Kommunan eigur eisini fleiri bygningar ið verða nýttir til sosial- og heilsuendamál. Talan er um ellis- og røktarheim, sambýli, læknamiðstøðir.

Størsti bólkurin av bygningum er til barnaansing. Nýggir bygningar verða tiknir í brúk og skulu røkjast, men tað eru fleiri av teimum gomlu bygningunum, sum krevja munandi ábøtur. Serliga eru tað vindeygu, hurðar, klædningur og tøk, sum mugu skiftast. Húsaumsitingin hevur fingið allar hesar stovnar brunasýndar. Ábøtur og broytingar verða gjørdar so hvørt soleiðis, at teir lúka brunakrøvini, ið sett verða nú.

**<u>Orkupolitikkur</u>**

Húsaumsitingin er farin undir at skráseta alla orkunýtslu, orkuslag og orkuútgerð á øllum bygningum. Hetta er fyrsta stig í stórum arbeiði, ið hevur sum mál at tálma $CO^2$

[6] Útreisðlurnar til Húsaumsitingina, undantikið deildarleiðaran, fer av konto 82.

útlát og at fara undir eina tilgongd at fremja orkusparandi tiltøk. Fyrsta stig av arbeiðinum – sum er skrásetingararbeiði – var liðugt í 2008.

**Annað**
Húsaumsitingin nýtir telduforritið Caretaker, sum savnar allar upplýsingar um bygningarnar á einum staði.

Talan er um at skráseta allar upplýsingar um bygningarnar, matr. nr., støðd o.a. og at knýta tekningar, myndir og annað tilfar saman við soleiðis, at allar upplýsingar eru tøkar á einum stað. Skipanin skal eisini brúkast til at hava yvirlit yvir røkt av bygningum, og til skráseting av tryggingum, leigusáttmálum og øðrum avtalum.

**Broyting í virkseminum í 2009**
Virksemið hjá Húsaumsitingini er eisini vaksið í seinnu helvt av 2008, tá deildin fekk fleiri bygningar at umsita. Nevnast kunnu partur av skúlanum við Løgmannabreyt, bygningur til kvøldskúla, røktarheim við Tjarnargarð og Badmintonhøllin. Í 2009 kemur restin av skúlanum við Løgmannabreyt og væntandi eisini fyrsti partur av skúlanum á Hamrinum á Argjum afturat.

Í 2009 er játtanin til ein húsavørð flutt frá konto 32 Musikkskúlin til konto 82.

## Húsaumsitingin kostar[7]:

| *t.kr.* | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknis. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Fastar útreiðslur* | *15.873* | *14.827* | *13.230* | *13.927* |
| *Barnaansing* | *4.450* | *5.130* | *4.070* | *4.397* |
| *Skúlamál* | *11.770* | *15.550* | *16.080* | *12.557* |
| *Mentan og frítíð* | *2.150* | *2.600* | *2.100* | *692* |
| *Sosial og heilsumál* | *3.000* | *1.200* | *900* | *870* |
| *Sethús kommununnar* | *1.765* | *2.065* | *0* | *720* |
| *Onnur hús* | *3.977* | *6.108* | *0* | *2.651* |
| *Annað* | *0* | *-5.000* | *4.300* | *3.387* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***42.985*** | ***42.480*** | ***40.680*** | ***39.201*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *650* | *1.280* | *1.280* | *1.476* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***42.335*** | ***41.200*** | ***39.400*** | ***37.725*** |

[7] Konto 81 er niðurlagt og tølini fyri 2007 lagt ind undir konto 82.

# Skúlamál

Skúlamálini fevna um fólkaskúlarnar, kvøldskúlan og musikkskúlan.

## Fólkaskúlin[8]

Kommunan ber sambært løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um Fólkaskúlan við seinni broytingum útreiðslur til rakstur av fólkaskúlunum, undirvísingarmiðlar, næmingaflutning, lønir til skrivarar, reingerð, skúlabókasøvn, sernámsfrøðiligar tænastudeplar og røkt av serstovum og savnsrøkt.

Í kommununi eru 12 kommunalir fólkaskúlar og 2 frískúlar. Ein skúli hevur forskúla.

Í játtanini fyri 2009 er lagt upp fyri, at virksemið á fólkaskúlunum er víðkað við nýggjum skúla við Løgmannabreyt[9]. Skúlin verður 2-sporaður, 1. til 9. flokk við frítíðarskúla.

Arbeiðið at byggja nýggjan skúla á Argjum fór í gongd í 2007. Skúlin verður 2-sporaður, 1. til 9. flokk við frítíðarskúla. Fyrsti partur verður eftir ætlan klárur at taka í nýtslu á heysti 2009.

KT-økið er eitt øki, sum verður raðfest á skúlunum, og tí er játtanin til skúlarnar hækkað við umleið 900 tkr.til tað endamálið.

***Næmingatal:***

| | *2008/2009* | *2007/2008* | *2006/2007* | *2005/2006* |
|---|---|---|---|---|
| ***Næmingar samantaldir*** | *2887* | *2981* | *3057* | *3129* |
| | | | | |
| *Eysturskúlin* | *491* | *512* | *564* | *582* |
| *Kommunuskúlin* | *509* | *551* | *573* | *592* |
| *Venjingarskúlin* | *426* | *441* | *446* | *481* |
| *Hoyvíkar skúli* | *390* | *494* | *465* | *457* |
| *Løgmannbreyt* | *109* | | | |
| *Argja skúli* | *325* | *330* | *347* | *368* |
| *Sankta Frans skúli* | *264* | *283* | *300* | *302* |
| *Adventistaskúlin* | *105* | *107* | *113* | *111* |
| *Kollafjarðar skúli* | *134* | *135* | *142* | *124* |
| *Kaldbaks skúli* | *30* | *28* | *29* | *33* |
| *Velbastaðar skúli* | *48* | *52* | *48* | *44* |
| *Nólsoyar skúli* | *23* | *31* | *28* | *33* |
| *Fríska´ulin á Velbastað* | *31* | *15* | | |
| *Skúlin í Hesti* | *2* | *2* | *2* | *2* |

[8] Játtanin til fólkaskúlaøkið er á konto 20-30, 33 og 310

[9] Ilt er tó at vita, um játtanin er nøktandi, tí virksemið júst er byrjað. Tí verður fyrivarnið tikið, at broytingar kunnu koma seinni. Í 2009 er lagt upp fyri fleiri broytingum m.a. at fleiri flokkar fara frá Hoyvíkar skúla til Løgmannabreyt og at Hoyvíkar skúli fær framhaldsdeild frá august 2009. Talan er um mett tøl.

### Fólkaskúlin kostar[10]:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *11.140* | *9.266* | | *9102* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur samantaldar* | *20.956* | *19.573* | | *17.621* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***32.096*** | ***28.839*** | | ***26.723*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *80* | *80* | | *975* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***32.016*** | ***28.759*** | | ***25.748*** |

# 33 Felags skúlamál

Á kontu 33 er, umframt játtan til frískúlar, eisini játtan til ymiskar verkætlanir og aðrar útreiðslur á fólkaskúlunum.

Játtan er eisini sett av at endurgjalda lærlingaútreiðslur. Sambært løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar við seinni broytingum gjalda kommunur 20% av rakstrarstuðli til lærlingaundirvísing. Harumframt er lagt upp fyri útreiðslum til skúlagjald fyri næmingar á Serskúlanum.

Konta 33 hevur harumframt útreiðslur til onnur endamál, m.a. stuðul til Klippfisk-filmskúlan.

### Felags skúlamál kostar[11]:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| ***Útreiðslur í alt*** | ***4.457*** | ***4.275*** | ***3.020*** | ***4.408*** |

# 31 Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, Tórshavnar Listaskúli

Lógin gevur møguleika at skipa frítíðarundirvísing, sum er í samsvari við krøvini, ið nútíðarsamfelagið setur. Undirvísingin kann verða skipað í øllum lærugreinum og evnum, sum íbúgvarnir vilja hava eftir reglum, ið Mentamálaráðið setur.

Kommunan og skúlin hava tí heimild til eftir tørvi at seta á stovn hesa undirvísing. Undirvísingin skal fara fram í góðum og væl hóskandi hølum.

Undirvísingin er býtt í 3 partar:
1. Almenn frítíðarundirvísing
2. Serstøk frítíðarundirvísing
3. Frítíðarvirksemi

[10] Við Adventistaskúlanum og Fríslkúlanum, sum er játtaður á konto 33.
[11] Herundir er eisini játtan til Adventistaskúlan og Frískúlan, tí hesi eru játtaði undir konto 33. Vart skal gerast við at tølini fyri skúlabarnakoyring fyri 2008, 2007 Æ og R eisini eru flutt til konto 18.

Serstaka frítíðarundirvísingin fevnir um:
a) Royndarfyrireikandi undirvísing
b) Serundirvísing
c) Yrkiskenda undirvísing

Skúlin hevur royndarfyrireikandi undivísing í 9. og 10. flokki, sum endar við próvtøku. Yrkiskend undirvísing fevnir um dugnaskapsroynd í sigling, og S.R.C-skeið. Hesi skeið enda øll við próvtøku.

Undir serundirvísing hevur skúlin nógv tilboð fyri brekað, menningar- og rørslutarnað.

Tann almenna frítíðarundirvísingin, og frítíðarvirksemið annars, fevnir m.a um hesar lærugreinir: spinning, plantuliting, skaftvevnað, rammuvevnað, myndavevnað, tøving, tilskering, seyming, binding, hekling, patchwork, brodering, bókbinding, smíð, dreying, træskurð, modellbátar og modellskip, at umvæla og polstra gamalt innbúgv. Harumframt er frálæra í svimjing, fimleiki, talvi, matgerð, ættargransking, teldulæru, dansi, drama/sjónleiki, støddfrøði, føroyskum, donskum, íslendskum, enskum, fronskum, russiskum, tónleiki, kórsangi o.ø.

Fyri tilflytarar, ið ikki hava kunnleika til føroyska samfelagið og gerandisdagin, bjóðar skúlin fram skeiðið "føroyskt og samfelgskunning fyri tilflytarar" sum almenna lærugrein. Eisini stendur tilflytarum 20 tíma skeið í boði.

Í samstarvi við Klippfisk-filmskúlan fer skúlin í komandi ári at bjóða 4-5 lærugreinir út á filmsøkinum.

Í Listaskúlanum er tilevning, tekning, modelltekning, máling, postalínsmáling, leirarbeiði, grafikkur, bein- og hornarbeiði, steinslíping og silvurarbeiði, videolæra, myndatøka, o.m.a.

***Næmingatal í kvøldskúlanum:***

| | *2008/2009* | *2007/ 2008* | *2006/ 2007* | *2005/ 2006* |
|---|---|---|---|---|
| *Næmingatal* | *3137* | *(3.500)* | *3.500* | *3.323* |
| *Lærugreinatal* | *231*[12] | *80* | *80* | *77* |
| *Undirvísingarstøð í býnum* | *31* | *30* | *31* | *31* |

## Kvøld-, ungdóms,- og listaskúlin kostar:

| ***t.kr.*** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *5.901* | *6.017* | *5.900* | *4.628* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *1.727* | *1.735* | *2.184* | *1.626* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***7.628*** | ***7.751*** | ***8.084*** | ***6.254*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *3.300* | *3.300* | *3.150* | *2.128* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***4.328*** | ***4.451*** | ***4.934*** | ***4.126*** |

# 32 Musikkskúlin

Musikkskúlin skal í samstarvi við heim, fólkaskúla og aðrar musikkfelagsskapir, menna musikalsku evni og gávur næminganna. Skúlin skal leggja grundarlagið undir eitt ríkt musikklív á staðnum.

[12] 231 skeiðsnummur (uml. 80-100 lærugreinar)

Musikkskúlin arbeiðir við at:

• menna skapandi og endurskapandi gávur næminganna
• stimbra áhugan fyri tónleiki og fremja fatan fyri tónleiki við tí fyri eygað, at hvør einstakur kann verða við í tónleikaligum virksemi
• menna næmingarnar persónliga, ikki minst teirra tilvitan um seg sjálvar sum part av felagsskapi, og medvit teirra um týdningin av samstarvi
• fyrireika næmingar til hægri tónlistaútbúgvingar
• gagna tónlistaumhvørvinum uttan fyri Musikkskúlans gátt

.

Undirvísingartilboðið skal vera umfatandi og skal so nógv sum til ber fevna um øll ljóðføri, klassiskan og rytmiskan tónleik, ljóðføris- og raddarfrálæru og samanspæl umframt frálæru í ástøði, hoyrilæru, tónleikasøgu, útseting, tónasmíði o.ø. Frálæra í samanspæli skal verða týðandi partur av øllum virksemi Musikkskúlans.

Skúlagongdin verður skipað eftir eini heildarætlan, har næmingurin, umframt frálæru í sínum ljóðføri, eisini er við í ástøðiligum lærugreinum, samanspæli og í tiltøkum.

Nettojáttanin er størri í 2009 enn 2008. Hetta er ein avleiðing av, at nærmingagjøld helst eru mett ov høgt í 2007 og 2008. Musikkskúlin hevur fingið eina skipan, sum ger tað lættari at meta um gjøldini. Lønin til húsavørðin er flutt til konto 82.

***Næningatal og bíðilisti:***

| | *2008* | *2007* | *2006* | *2005* |
|---|---|---|---|---|
| *Næmingatal* | *587* | *557* | *564* | *557* |
| *Næmingar á bíðilista* | *3.383* | *2.917* | *2.801* | *2.714* |

## Musikkskúlin kostar:

| ***t.kr.*** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *9.591* | *9.814* | *9.674* | *7.653* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *1.879* | *1.654* | *1.543* | *1.345* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***11.470*** | ***11.468*** | ***11.217*** | ***8.998*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *4.645* | *4.798* | *4.743* | *3.491* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***6.825*** | ***6.670*** | ***6.474*** | ***5.507*** |

# Mentan og frítíð

Mentan og frítíð fevnir um Tórshavnar býarsavn, býarbókasavnið, svimjihøllina og stadionøkið.

## 34 Tórshavnar býarsavn

Tórshavnar býarsavn arbeiðir eftir løgtingslóg um bygdasøvn.

Býarsavnið skrásetir gripir og røkir samskiftið við fólk og stovnar, ið lata frá sær gripir til Býarsavnið. Savnið skipar fyri framsýningum, svarar fyrispurningum frá borgarum og hevur samband við søvn og felagsskapir í Tórshavnar kommunu. Býarsavnið ráðgevur Tórshavnar býráð um mentanarsøgulig fyrilit at sýna í sambandi við byggisamtyktir og byggiloyvi.

### Býarsavnið kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***851*** | ***800*** | ***800*** | ***662*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *250* | *250* | *250* | *326* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***601*** | ***550*** | ***550*** | ***336*** |

## 35 Býarbókasavnið

Býarbókasavnið er fólkabókasavnið í Tórshavnar kommunu. Ein partur av bókasavninum er barnabókasavn.

Bókasavnið samstarvar við tey 11 skúlabókasøvnini og við Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn.

Sjey stovnar læna smá søvn frá bókasavninum. Teir eru Dagtilhaldið í Nólsoy, Ellisheimið, Heimið við Vallalíð, Hvíldarheimið Naina, Lágargarður, Tjarnargarður og Varðhaldið.

Býarbókasavnið virkar eftir løgtingslóg um bókasøvn.

Eftirspurningurin eftir tíðarhóskandi samskifti og atgongd til vitan vindur upp á seg, tí verður dentur lagdur á støðugt at betra og økja teldutænastuna.

Dentur er lagdur á at hava tíðarhóskandi tilfar: bøkur, ljóðbond, ljóðfløgur og DVD.

Bókasavnið er í dag, sammett við fyrr, eitt tilhaldsstað og eftir førimuni verður roynt at geva tí góðar umstøður.

Í 2009 verður arbeitt við at skifta til telduskipanina DDElibra, sum er mest brúkta telduskipan á donskum fólkabókasøvnum og hevur royndir gjøgnum 25 ár.

Býarbókasavnið samstarvar við skúlabókasøvnini um bókakeyp, skráseting, felags telduforrit og o.a. Endamálið er, at øll skúlabókasøvn skulu vera dagførd. Skúlin við

Løgmannabreyt kom afturat á heysti 2008, arbeitt verður við at byggja upp eitt grundleggjandi savn á skúlanum.

Arbeitt verður við at seta eina deild við vaksnamanna- og barnabókum á stovn í Nólsoy.

Býarbókasavnið skipar fyri, at rørslutarnað, sum fegin vilja læna frá bókasavninum, fáa tilfarið koyrt heim.

***Lyklatøl13:***

| | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|
| *Vitjandi* | *91.508* | *84.584* | *79.693* |
| *Útlán, Býarbókasavnið* | *77.897* | *74.203* | *77.355* |
| *Útlán skúlabókasøvn* | *47.275* | *27.846* | *35.129* |

## Býarbókasavnið kostar:

| **t.kr.** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *4.847* | *4.771* | *4.223* | *4.241* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *3.655* | *3.666* | *4.005* | *3.261* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***8.502*** | ***8.437*** | ***8.228*** | ***7.502*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *1.663* | *1.673* | *1.653* | *1.696* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***6.839*** | ***6.764*** | ***6.576*** | ***5.806*** |

# 36 Svimjihøllin

Svimjihøllin er karmur um almenna svimjing, ítróttarsvimjing hjá Havnar Svimjifelag, ið er við í kappingum á altjóða støði, umframt undirvísing hjá skúlanæmingum og dagstovnum. Svimjihøllin er opin fyri almenninginum 47 tímar um vikuna og virkar sum savningarstað hjá ungum og gomlum.

Endamálið við játtanini til Svimjihøllina er at bøta um heilsuna hjá borgarunum og veita eina góða tænastu.

## Svimjihøllin kostar:

| **t.kr.** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *5.349* | *5.285* | *5.233* | *5.527* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *2.724* | *2.619* | *2.619* | *2.448* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***8.073*** | ***7.904*** | ***7.852*** | ***7.975*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *2.330* | *1.930* | *2.280* | *2.294* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***5.743*** | ***5.974*** | ***5.572*** | ***5.681*** |

# 37 Stadion

Stadion-virksemið fevnir um ítróttarøkið í Gundadali, vøllin á Argjum, smáar graslíkisvøllir ymsastaðni í kommununi og Tórsbreyt, ítróttarøkið til frælsan ítrótt.

[13] Tølini eru við fyrivarni

### Stadion kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *671* | *650* | *600* | *689* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *3.380* | *3.380* | *3.380* | *5.862* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***4.051*** | ***4.030*** | ***3.980*** | ***6.551*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *0* | *0* | *0* | *0* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***4.051*** | ***4.030*** | ***3.980*** | ***6.551*** |

# 39 Ymsir studningar

Játtanin á konto 39 er til stuðul til mentan og ítrótt. Stuðulin verður veittur til ymisk endamál, millum annað til feløg at reka ítróttar- og mentanarvirksemi, til mentunarlig tiltøk, til tónleika- og bókmentaútgávur. Kunningarstovan fær eisini stuðul av hesi konto.

Í 2009 eru 100 ár síðani Tórshavn gjørdist fólkavald kommuna og keypstaður. Tí er serstøk játtan á hesi konto til mentanarlig tiltøk í tí sambandi. Samskipari er settur at fyrireika og fyrisita hátíðarhald, sum verður myndað av nógvum tiltøkum, ið venda sær til allar borgarar í kommununi alt árið. Hugsjónarligi karmurin kring øll tiltøkini er at gera vart við fólkaræði, sum í Tórshavnar kommunu hevur 100 ár á baki. Ein arbeiðsnevnd verður sett at samskipa tiltøk saman við samskiparanum. Arbeiðsnevndin skal hava samband við umboðini fyri tey, ið fyrireika tey ymisku einstøku tiltøkini í kommununi.

### Ymsir studningar kosta[14]:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| ***Útreiðslur í alt*** | ***11.860*** | ***9.060*** | ***7.353*** | ***7.096*** |

# 64 Stuðul til feløg o.o.

Játtanin er til íløgustuðul til sjálvsognarstovnar og feløg. Kommunan hevur millum annað latið ítróttarfeløgum stuðul at byggja felagshús, stuðul er latin Hoyvíkar kirkju, og Norðurlandahúsið hevur fingið stuðul til útbyggingina Athøll.

### Stuðul til feløg o.o. kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| ***Útreiðslur í alt*** | ***3.022*** | ***3.022*** | ***3.750*** | ***2.728*** |

[14] Ein útgreining av kontuni sæst í skjali 1.

# Børn og ung

Í kommununi eru 31 dagstovnar, dagrøkt, tvær frítíðarstovur, 6 frítíðarskúlar og ungdómshúsið Margarinfabrikkin. Tilsamans eru áleið 2.300 børn í skipanini. 380 ársverk eru knýtt at stovnunum, og gevur tað áleið 450 starvsfólk.

Játtanin til dagstovnar táttar í 139 mill í 2009. Størsti parturin fer til at løna starvsfólkunum. Sambært dagstovnalógini skal starvsfólkabýtið á dagstovnunum verða í minsta lagi 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar. Í serligum føri kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum kravi.

Játtanin til aðrar útreiðslur fer fyrst og fremst til hita, el og húsarhaldsvørur. Flest allir dagstovnar bjóða morgunmat og millummála, einstakir stovnar bjóða eisini breyð ella døgurða á middegi. Til tess at bjóða børnunum fjølbroyttar og mennandi upplivingar er neyðugt, at børnini hava hóskandi leikur og tilfar til dagdvølju. Eisini er peningur settur av, til at starvsfólkið framhaldandi verður ment á økinum. Skrivstovuhald og telduútbúnaður er eisini ein partur av játtanini, umframt játtan til útferðir og summarlegur.

Í 2009 er eisini lagt upp fyri útreiðslum til Námsfrøðisliga Sálarfrøðiliga Ráðgeving (NSR). Málsøkið er burturav landsins, men av tí at mett verður, at tað er eitt framstig fyri tænastustøðið, hevur kommunan játtað at gjalda fyri vanligan skrivstovurakstur og løn til ein skrivara. Mentamálaráðið hevur síðani 2006 arbeitt við at skipa NSR eindir kring landið. Ein NSR tænasta er í Eysturoynni og ein í Suðuroy. Leiðari varð settur fyri NSR tænastuna í Tórshavnar kommunu 1. september 2008.

## Barnaansing kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur íalt* | *133.192* | *126.029* | *121.770* | *119.229* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur íalt* | *18.378* | *17.260* | *16.642* | *15.190* |
| ***Rakstrarútreiðslur íalt*** | ***151.570*** | ***143.289*** | ***138.412*** | ***134.419*** |
| *Húsaútreiðslur íalt* | *2.517* | *2.861* | *2.925* | *3.400* |
| *Barna- og ungdómsdeildin* | *22.520* | *24.608* | *22.378* | *20.780* |
| *Inntøkur íalt* | *-37.641* | *-35.758* | *-41.462* | *-39.352* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***138.966*** | ***135.000*** | ***122.253*** | ***119.247*** |

***Barnatal:***

| | *2009* | *2008* | *2007* | *2006* |
|---|---|---|---|---|
| *Dagrøkt* | *70* | *130* | *150* | *150* |
| *Kommunalir stovnar* | *1.401* | *1.344* | *1.238* | *1.250* |
| *Sjálvsognarstovnar* | *311* | *310* | *387* | *383* |
| *Frítíðarskúlar* | *445* | *422* | *431* | *401* |
| *Margarinfabrikkin* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| ***Íalt*** | ***2.327*** | ***2.306*** | ***2.306*** | ***2.284*** |

***Árligar rakstrarútr. pr. barn fyri kommununa, 75[15] % av samlaða kostnaðinum:***

| | *2009* | *2008* | *2007* | *2006* |
|---|---|---|---|---|
| *Barnagarður* | *47.570* | *45.787* | *41.204* | *40.375* |
| *Vøggustova* | *76.119* | *73.236* | *65.921* | *64.589* |
| *Frítíðarskúli* | *27.550* | *26.483* | *23.783* | *23.221* |
| *Dagrøkt* | *88.423* | *61.324* | *53.594* | *42.138* |

[15] 70 % fram til 2007

***Mánaðarligt foreldragjald, 25[16]% av samlaða kostnaðinum:***

| | *2009* | *2008* | *2007* | *2006* |
|---|---|---|---|---|
| *Barnagarður* | *1.464* | *1.480* | *1.630* | *1.597* |
| *Vøggustova* | *2.331* | *2.242* | *2.596* | *2.543* |
| *Frítíðarskúli* | *925* | *888* | *1.025* | *1.001* |
| *Dagrøkt 0-3 ár* | *2.331* | *1.869* | *2.102* | *2.045* |
| *Dagrøkt 3-6 ár* | *1.464* | *1.355* | *1.500* | *1.500* |

[16] 30 % fram til 2007

# Sosial- og heilsumál

## Barnaverndarøkið

Nýggj barnaverndarlóg kom í gildi 1. januar 2006. Endamálið við lógini er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa tryggan uppvøkstur.

Í barnaverndarlógini er nágreiniliga ásett, hvørjar uppgávurnar eru hjá ávikavist nevnd og umsiting. Barnaverndarnevndin skal einans taka avgerðir eftir tilmæli frá umsitingini. Tað merkir, at umsitingin skal gera alt fyrireikandi arbeiðið, og meira enn áður skal umsitingin eisini vera tøk eftir vanliga arbeiðstíð og í vikuskiftunum.

Samgongan hevur sett sær fyri at seta tiltøk í verk til tess at tálma rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu millum ung. Í hesum sambandi hevur sosiala nevnd játtað Margarinfabrikkini stuðul til royndarverkætlanina ”Street team”, sum hevur til endamáls í vikuskiftinum at fáa samband við tey ungu, sum vanliga ikki gera brúk av teimum tilboðum, sum Margarinfabrikkin hevur at bjóða.

### Barnavernd og eldrarøkt kosta[17]:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Barnavernd og manglandi barnaansing* | *16.222* | *15.400* | *14.875* | *17.795* |
| *Aðrar útreiðslur* | *685* | *1.285* | *1.285* | *820* |
| *Eldrarøkt* | *2.550* | *2.609* | *1.850* | *1.115* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***19.457*** | ***19.294*** | ***18.010*** | ***19.730*** |

## 41 Lækna- og heilsumál

Í Tórshavnar kommunu eru 10 kommunulæknar – av teimum 9 í Havn og ein í Kollafirði.

Sambært løgtingslóg um kommunulæknaskipan er tað ábyrgd kommununar at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknarnar og bera útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi. Eisini skal kommunan útvega frían bústað til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

Sambært løgtingslóg rindar kommunan stuðul til Hvíldarheimið Naina.

Nýggj talgild heilsuskipan, sum Almanna- og heilsumálaráðið hevur gjørt avtalu um fyri føroyska heilsuverkið, hevur verið roynd í Tórshavnar kommunu. Skipanin er boðin øllum kommunulæknunum í kommununi og 6 hava tikið av.

Nýggj læknamiðstøð til fýra kommunulæknar verður bygd í Hoyvíkshaganum, eisini Apoteksverkið og heilsusystrarnar skulu hava innivist har.

[17] Á konto 40 eru eisini útreiðslur til eldraøkið o.a.

### Lækna-og heilsumál kosta:

| t.kr. | Ætlan 2009 | Ætlan 2008 | Ætlan 2007 | Roknsk. 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur samantaldar | 1.050 | 1.000 | 950 | 997 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 3.460 | 3.405 | 3.355 | 4.921 |
| **Rakstaraútr. netto** | **4.510** | **4.405** | **4.305** | **5.918** |

# 411 Serflutningsskipan Landsins

Serflutningsskipanin er sambært reglugerð ein flutningsskipan fyri brekað, ið hava tørv á serflutningi. Endamálið við skipanini er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól ella í avmarkaða tíð vegna sjúku ella skaða hava henda tørv. Skipanin fevnir ikki um sjúkraflutning.

Skipanin verður fíggjað ávikavist av kommununi, landskassanum og av brúkarunum. Tó gjalda brúkarar í Tórshavn kommunu ikki, tí tað er ókeypis at koyra við bussleiðini í kommununi og hetta skal ikki verða øðrvísi fyri tey, sum mugu nýta Serflutningsskipanina.

Visitatiónin til Serflutningsskipan Landsins er flutt frá MBF til kommununa at umsita.

### Serflutningsskipan Landsins kostar:

| t.kr. | Ætlan 2009 | Ætlan 2008 | Ætlan 2007 | Roknsk. 2007 |
|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur samantaldar** | **735** | **705** | **705** | **705** |
| Inntøkur samantaldar | 340 | 325 | 380 | 194 |
| **Rakstaraútr. netto** | **395** | **380** | **325** | **511** |

# 42 Tannlæknastovan

Barnatannrøktin fevnir um øll børn og ung undir 16 ár í kommununi. Tannlæknastova er í Tórsgøtu í Havn og á skúlanum í Kollafirði. Eisini í nýggja skúlanum við Løgmannabreyt verður ein tannlæknastova. Harumframt verður farið út á skúlarnar til undirvísing í tannrøkt. Tannrættingin fer fram á Sertannlæknastovuni á Tinghúsvegnum, sum kommunan hevur tænastusáttmála við.

Tannlæknastovan hevur skyldu til at tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt sambært løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt frá 6. mars 1998.

Tannlæknastovan skal tryggja hesum aldursbólki ókeypis fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt. Tað verður m.a. gjørt við fyribyrgjandi tiltøkum, upplýsingarvirksemi og regluligum kanningum og viðgerð.

**Tannlæknastovan kostar:**

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *6.901* | *6.341* | *6.056* | *6.357* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *3.429* | *3.224* | *3.224* | *3.725* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***10.330*** | ***9.565*** | ***9.280*** | ***10.082*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *30* | *30* | *30* | *16* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***10.300*** | ***9.535*** | ***9.250*** | ***10.066*** |

# Eldraøkið

Málsøkið eldrarøkt er landsins. Uppgávan hjá kommununi er sambært lóggávu at taka stig til at byggja eldrabústaðir.

Kommunan rekur stovnar á eldraøkinum við endurfígging frá landinum.

Kommunan veitir stuðul til Døgurðaskipan hjá pensionistum, sum Lágargarður stendur fyri. Eisini stuðlar kommunan ymsum tiltøkum á eldraøkinum

# Heimavitjunartænastan[18]

Heimavitjanartænastan vitjar regluliga í heiminum hjá teimum gomlu frá 75 ára aldri.

Heimavitjanartænastan er í 2008 víðkað við einum fysioterapeuti, soleiðis at pensionistar, ið búgva við hús, kunnu koma til venjingar á Tjarnargarði. Hetta er eitt ískoyti til venjingartilboðini í Tilhaldinum og Lágargarði, sum fer at gera tað møguligt hjá fleiri eldri borgarum í kommununi at venja, so tey á tann hátt betra og varðveita sín førleika.

Heimavitjanartænastan gevur ráð um heilsu, trivnað og sosial viðurskifti. Endamálið er at varðveita heilsuna og førleikan hjá teimum gomlu og at royna at bera so í bandi, at heilsustøðan hjá teimum, sum hava brek, ikki versnar. Endamálið er eisini at veita tryggleika og trivnað og stuðla undir politiska málsetningin hjá Tórshavnar kommunu:

*At arbeiða fyri at tey gomlu kunnu verða búgvandi í egnum heimi so leingi, tey vilja tað.*
*At arbeiða fyri at tey gomlu í kommununi skulu hava eitt virðiligt lív, har lívsgleði og trivnaður er í hásæti.*

# 43 Ellis- og umlættingarheimið

Ellisheimið er bústovnur fyri 25 eldri fólk, ið orsakað av ellisbrekum ella kroniskari sjúku eru partvís ella heilt óhjálpin og sostatt ikki kunnu búgva heima.

[18] Heimavitjunartænastan er játtað undir konto 40

Endamálið er at veita einstaka búfólkinum røkt, umsorgan og trivnað í einum so heimligum umhvørvi sum gjørligt. Ellisheimið skal tryggja, at veitingin verður veitt við virðing fyri samleikanum og sjálvsavgerðarrættinum hjá tí einstaka.

Umlættingarheimið veitir heimabúgvandi pensionistum og teirra avvarandi umlætting. Pláss er fyri 8 fólkum í senn. Arbeiðið á Ellisheiminum og Umlættingarheiminum er í ávísan mun samskipað.

Ætlanin er í 2009 at fáa samstarv í lag við Tjarnargarð, soleiðis at búfólkini á Ellisheiminum eisini kunnu fáa ágóðan av tí útbúnaði til fysioterapi, sum er á Tjarnargarði.

# 431 Sambýlið í Hoydølum

Í Sambýlinum oman Hoydalar er pláss fyri níggju búfólkum. Endamálið er at hjálpa pensionistum við ellisbrekum, ið hava tørv á starvsfólki og hjálp í gerandisdegnum.

Kommunan fyrisitur raksturin, men heimarøktin umsitur dagliga arbeiðið á heiminum. Búfólkini fáa ta heimarøkt, tey annars høvdu fingið heima. Tó rindar kommunan fyri náttarvakt. Búfólkini varðveita sína fólkapensión og rinda fyri kost, húsaleigu og aðrar felags útreiðslur.

## Sambýlið í Hoydølum kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *650* | *650* | *600* | *559* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *360* | *330* | *295* | *451* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***1.010*** | ***980*** | ***895*** | ***1.010*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *340* | *340* | *340* | *332* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***670*** | ***640*** | ***555*** | ***678*** |

# 432 Tjarnargarður

Tjarnargarður er bústovnur hjá 34 eldri búfólkum, ið orsakað av ellisbrekum ella kroniskari sjúku fyri ein part ella fullkomiliga eru óhjálpin og sostatt ikki kunnu búgva heima.

Endamálið er at veita einstaka búfólkinum røkt, umsorgan og trivnað í einum so heimligum umhvørvi sum gjørligt. Tjarnargarður skal tryggja, at veitingin verður veitt við virðing fyri samleikanum og sjálvsavgerðarrættinum hjá tí einstaka.

Dagdeildin á Tjarnargarði er dagstovnur hjá 15 minnisveikum brúkarum, sum búgva heima, men koma á dagstovnin um dagin fyri at fáa eina innihaldsríka tilveru í dagtímunum saman við fólki við serligum innliti í minnisveikleika. Tey skulu hava møguleika at vera heima longri, samstundis sum tey nærmastu vera avlastað.

# 433 Vallalíð

Heimið við Vallalíð er bústovnur hjá 16 minnisveikum búfólkum, ið orsakað av síni sjúku fyri ein part ella fullkomiliga eru óhjálpin og sostatt ikki kunnu búgva heima.

Endamálið er at veita einstaka búfólkinum røkt, umsorgan og trivnað í einum heimligum, livandi og mennandi umhvørvi, har tey ikki keða seg, ikki kenna einsemi og ikki kenna hjálparloysi. Vallalíð leggur dent á, at arbeiðið verður grundað á nýggjastu vitan um at taka sær av fólki við demenssjúku, og at arbeiðið verður grundað á sosialpsykologiskan hugburð, sum tekur støði í virðingin fyri fortíðini, nútíðini og framtíðini hjá tí einstaka búfólkinum.

Miðað verður eftir at geva búfólkunum møguleikan at verða við í dagliga arbeiðinum á heiminum sum til dømis at matgera, gera reint, vaska klæði og at geva búfólkunum møguleika at geva t.d. børnum, djórum og plantum umsorgan.

# 434 Sambýlið í Kollafirði

Í sambýlinum í Kollafirði búgva 7 búfólk. Kommunan fyrisitur raksturin, men heimarøktin umsitur dagliga arbeiðið á heiminum. Búfólkini fáa ta heimarøkt, tey annars høvdu fingið heima. Tó rindar kommunan fyri náttarvakt. Búfólkini varðveita sína fólkapensión og rinda fyri kost, húsaleigu og aðrar felags útreiðslur.

## Sambýlið í Kollafirði kostar:

| ***t.kr.*** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *650* | *650* | *600* | *544* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *265* | *265* | *215* | *439* |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***915*** | ***915*** | ***815*** | ***983*** |
| *Inntøkur samantaldar* | *325* | *260* | *260* | *326* |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***590*** | ***655*** | ***555*** | ***657*** |

# 435 Sambýlið í Mattalág

Sambýlið í Mattalág lat upp í august 2008. Í sambýlinum búgva 9 búfólk. Kommunan fyrisitur raksturin, men heimarøktin umsitur dagliga arbeiðið á heiminum. Búfólkini fáa ta heimarøkt, tey annars høvdu fingið heima. Tó rindar kommunan fyri náttarvakt. Búfólkini varðveita sína fólkapensión og rinda fyri kost, húsaleigu og aðrar felags útreiðslur.

## Sambýlið í Mattalág kostar:

| ***t.kr.*** | ***Ætlan 2009*** | ***Ætlan 2008*** | ***Ætlan 2007*** | ***Roknsk. 2007*** |
|---|---|---|---|---|
| *Lønarútreiðslur samantaldar* | *650* | *0* | | |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | *360* | *500* | | |
| ***Rakstrarútreiðslur samantaldar*** | ***1.010*** | ***500*** | | |
| *Inntøkur samantaldar* | *340* | *0* | | |
| ***Rakstaraútr. netto*** | ***670*** | ***500*** | | |

# 44 Tilhaldið í Tórsgøtu

Tilhaldið í Tórsgøtu húsast í gomlu Føroya Banka-húsunum frá 1906, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu.

# 441 Tilhaldið í Nólsoy

Tilhaldið í Nólsoy byrjaði sítt virksemi í 2008.

Endamálið við tilhaldunum í kommununi er at skapa karmar, so pensjónistar í kommununi varðveita og menna heilsuna, soleiðis at lívsgóðskan eisini á ellisárum verður sett í hásæti. Tilhaldini virka fyri at skapa eitt umhvørvi, har fólk kunnu gera tað, teimum dámar og har tey trívast.

# Aðrar útreiðslur

## 60 Ymsar aðrar útreiðslur

Henda konta verður nýtt til aðrar útreiðslur. Játtanin verður í høvuðsheitum nýtt til eftirløn, mennandi tiltøk, altjóða samstarv, millumkommunalt samstarv, umboðan og tiltøk í sambandi við hátíðarhald, vitjanir o.a. Játtanin verður eisini nýtt til parkeringsskipanina, summararbeiði hjá skúlaungdómi og vinnumenning.

Kommunan hevur seinatu árini raðfest vinnumenning ovarlaga. Endamálið við øllum verkætlanunum hjá Vinnumenningardeildini er at menna kommunalu karmarnar, sum vinnan virkar undir, í tøttum samstarvi við vinnuna í kommununi. Fyrstu árini eftir at hon var stovnað, hevði Vinnumenningini einamest ferðavinnu í brennideplinum. Nakrar av hesum verkætlanum eru um at verða loknar og málini rokkin, aðrar verkætlanir halda fram og nýggjar verða settar í gongd. Eftir ætlan verður ígongdseting, menning og nýskapan í vinnuni sett í brennidepilin í tøttum samstarvi við vinnuna sjálva. Eisini verða fleiri kanningarúrslit, sum Vinnumenningardeildin stendur fyri og arbeiðir við, klár.

2 mió kr. eru settar av til summararbeiði hjá skúlaungdómi. Staðfest er, at hetta er eitt avbera gott tiltak, sum við góðari fyriskipan og góðum formonnum er til stórt gagn fyri skúlaungdóm á gáttini til vaksnamannalívið.

Játtanin til ymiskar aðrar útreiðslur er á sama støði sum í 2008, men raðfest eitt sindur øðrvísi.

### Ymsar aðrar útreiðslur kosta[19]:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Útreiðslur í alt* | *11.210* | *11.135* | *10.640* | *9.942* |

## 63 Útveganir

Játtanin verður í høvuðsheitum brúkt til at talgilda fyrisitingarligar tænastur hjá Tórshavnar kommunu og at útvega og dagføra kunningartøknina hjá kommununi.

Talgild fyrisiting

Tórshavnar kommuna arbeiðir fyri, at allar veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini verða talgildar og atkomuligar hjá borgaranum á einfaldan hátt. Serligt fyrilit verður tikið fyri fólki við breki, eitt nú fyri blindum. Tøkniliga má ein slík skipan kunna verða gjørd við fleiri tøknum uttan serligar bindingar til nakran veitara ella nakra veitaratøkni. Brúkarin skal somuleiðis sleppa fram at heimasíðuni uttan serlig krøv til brúkaratøkni.

Tøknilig menning

Fyri at Tórshavnar kommuna kann fylgja við í tøkniligu menningini er neyðugt at útvega nýggja kunningartøkni og gera hana nútímans. Nýútveganin snýr seg

[19] Ein útgreining av kontuini síggjarst í skjal 2.

grundleggjandi um at bøta um kunningartøknina í umsitingini, so starvsfólk hava tey røttu amboðini fyri rættan prís at veita borgarunum góða tænastu.

Henda nýútvegan er neyðug, tá ið hugt verður at dátuvøkstri og brúkaratali, sum í løtuni liggur um 550. Við nýútveganini fær kommunan ein nógv effektivari rakstur av tøknini, so sum ambætarum, dátuneti, telefon, teldum og prentarum. Eisini verður tænastan hjá KT-deildini nógv betri, og brúkarin fer at fáa skjótari svar upp á fyrispurningar. Nýútveganin skal eisini geva KT-deildini rúm til at menna førleikan hjá starvsfólkunum í teldum, forritum o.ø.

Játtanin verður millum annað nýtt til hesi endamál/verkætlanir: roknskaparskipan, net og telefon, CSS-verkætlan, MS licensar, tilfeingisstýring, talgilda fyrisiting og fjararkiv.

### Útveganir kosta:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Útreiðslur í alt* | *5.000* | *6.409* | *5.572* | *7.170* |

# 68 Útskiftan av amboðum

Økið fevnir um at skifta út allar maskinur, bilar, amboð og arbeiðstól hjá kommununi, sum nú hevur eitt samlað virði uppá umleið 100 mió kr..

Endamálið við játtanin er at fáa aldurin á øllum amboðum, bilum, arbeiðstólum og maskinum niður á eitt hóskiligt støði við at hava ein miðal livialdur á umleið 10 ár, soleiðis at øll arbeiðsamboð eru tøkniliga dagførd og í fullgóðum standi.

Royndir hava víst, at kommunan hevur spart heilt nógvan pening við góðum amboðum, sum eru tøkniliga dagførd. Tað verða færri verkstaðartímar, og minni tíð at bíða eftir at fáa amboð umvæld.

Miðað verður ímóti at nýta umleið 10 mió kr. um árið.

### Útskiftan av amboðum kostar:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| *Útreiðslur í alt* | *7.000* | *6.500* | *6.500* | *15.066* |

# 69 Nýútvegan av amboðum

Tørvurin á nýggjum amboðum veksur ájavnt við øktar tænastur og størri vegakervi, størri kloakkskipanir o.a.

Størstu útreiðslurnar í 2009 eru til seramboð, ið hava skund at útvega. Veitingartíðirnar eru ofta minst eitt hálvt ár, og tí skulu slík amboð bíleggjast beinanvegin við ársbyrjan.

Eitt av hesum seramboðum er bilur til rottangatøming. Til tess at kommunan lýkur lógarásett krøv um rottangatøming er neyðugt við einum rottangabili afturat. Eitt annað av seramboðunum er ein bilur til at tøma vegristir. Við verandi útgerð røkkur Vegdeildin ikki runt einaferð um árið at tøma vegbrunnar. Hetta økir munandi um vandan fyri skaða, orsakað av yvirflóð.

## Nýútvegan av amboðum kosta:

| *t.kr.* | *Ætlan 2009* | *Ætlan 2008* | *Ætlan 2007* | *Roknsk. 2007* |
|---|---|---|---|---|
| ***Útreiðslur í alt*** | ***3.000*** | ***3.500*** | ***0*** | ***0*** |

# Lánsgjøld

Mett verður, at útreiðslur til lánsgjøld í 2009 verða 9.186 tkr. Harav eru 824 tkr. rentuútreiðslur og 1.692 tkr. til avdráttir uppá lán frá Havnar Arbeiðsmannafelag. Saldo 31. desember 2009 verður 5.179 tkr.

Kommunan hevur harumframt yvirtikið eitt lán frá Tórsvølli, sum kostar umleið 670 tkr. í 2009, býtt í 412 tkr. í rentuútreiðslur og 258 tkr. til avdráttir.

Harumframt er í fíggjarætlanini fyri 2008 lagt upp til, at eitt lán verður tikið í 2008. Mett verður, at rentuútreiðslurnar verða umleið 6 mió kr. í 2009. Roknað verður við, at lánið verður avdráttarfrítt í 2009.

# Íløguætlan 2009

Tórshavnar kommuna hevur verið í støðugum vøkstri í nógv ár, og setir hetta alsamt størri krøv á øllum økjum.

Í ár og komandi ár fær skúlaøkið størstu raðfesting. Skúlin við Løgmannabreyt verður liðugur komandi ár, samstundis sum skúlin á Hamrinum á Argjum stendur fyri durum, og Skt. Frants skúli skal útbyggjast. Fleiri aðrir skúlir krevja stórar ábøtur, og er hetta í gongd.

Talan er um stórar íløgur, sum eru fíggjarliga krevjandi. Alt gerst ikki um eina leið, og tí er neyðugt at raðfesta, soleiðis sum størstur tørvur er á.

Hesar íløgur merkja, at aðrar mugu bíða, inntil kommunan fær størri fíggjarligt rásarúm aftur.

| **Íløgur** | **tkr.** |
|---|---|
| Glyvursvegur 1-4. stig | 5.000 |
| Kloakkir | 10.000 |
| Renovatión | 2.200 |
| Kirkjugarðar | 2.000 |
| Fríðkan av býnum | 2.500 |
| Ítróttur og frítíðarvirksemi | 29.500 |
| Barnaansing | 2.000 |
| Skúlar og mentan | 87.000 |
| Eldraøkið | 5.000 |
| Smábátahavnir | 4.000 |
| **Tilsamans** | **149.200** |

# Skjal 1:
## Konto 39 Ymsir studningar

| Kontoheiti | Ætlan 2009 | Ætlan 2008 | Ætlan 2007 | Roknsk. 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Barnabókavirðislønin.................................. | 80 | 80 | 55 | 62 |
| M. A. J. heiðursløn..................................... | 125 | 125 | 80 | 67 |
| Grunnur Sonnu av Skarði............................ | 20 | 20 | 20 | 20 |
| Tónleikur o.l................................................ | 500 | 500 | 310 | 301 |
| Ítróttar- og samkomuhøllin........................... | 550 | 550 | 400 | 400 |
| Badmintonhøllin............................. | 500 | 500 | 0 | 0 |
| Kunningarstovan......................................... | 645 | 645 | 643 | 643 |
| Sjónleikur/tónleikur/listaframsýning.............. | 280 | 280 | 280 | 157 |
| Sjónleikarahúsið, rakstur.............................. | 1.100 | 1.100 | 850 | 850 |
| Havnasøgan, at seta í grunn......................... | 950 | 950 | 950 | 999 |
| Tiltøk í smb. við mentunarálit....................... | 150 | 250 | 250 | 240 |
| Sanglegat Sonnu D. Waagstein.................... | 20 | 20 | 20 | 20 |
| Listaverk..................................................... | 60 | 60 | 60 | 52 |
| Stuðul til ÍSB............................................... | 40 | 40 | 40 | 40 |
| Listasavn Føroya............................... | 150 | 150 | 150 | 155 |
| Listadagar í Tórshavn................................. | 300 | 300 | 300 | 246 |
| Westward Ho..................................... | 250 | 250 | 290 | 250 |
| 100 ára haldið | 3.000 | 300 | 0 | 0 |
| Annar studningur……………………… | 1.100 | 1.100 | 440 | 557 |
| Gjald til skúlar fyri ítróttarfeløg..................... | 100 | 100 | 100 | 75 |
| Studningur til ítróttarfeløg............................ | 500 | 500 | 675 | 675 |
| Studningar til skótar.................................... | 75 | 75 | 75 | 75 |
| Stuðul til feløg................................... | 150 | 150 | 100 | 76 |
| Sólarmagn...................................... | 15 | 15 | 15 | 15 |
| Asfalt................................................. | 200 | 200 | 200 | 186 |
| Gluggahyljar................................. | 400 | 400 | 400 | 400 |
| Tiltøk á Ólavsøka....................................... | 150 | 150 | 0 | 0 |
| Standmyndir/statuur | 350 | 0 | 0 | 0 |
| Bjargingarfelag/Froskmannafelag | 100 | 0 | 0 | 0 |
| Útgingið studningar | 0 | 250 | 650 | 535 |
| Í alt | 11.860 | 9.060 | 7.353 | 7.096 |

# Skjal 2:
## Konto 60 Ymsar aðrar útreiðslur

| Kontoheiti | Ætlan 2009 | Ætlan 2008 | Ætlan 2007 | Roknsk. 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Mennandi tiltøk............................ | 700 | 700 | 1.275 | 870 |
| Barnsburðagrunnur..................... | 0 | 0 | 600 | 0 |
| Skúlaungdómur........................... | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 1.665 |
| Eftirlønir...................................... | 3.260 | 3.000 | 3.060 | 2.865 |
| Hjálparfólkatrygging í grunn.......... | 0 | 0 | 600 | 799 |
| Hátíðarhald, flagging o. a............ | 940 | 940 | 500 | 1.052 |
| Stuðul til pensionistar.................. | 50 | 150 | 150 | 43 |
| Gamla havnin.............................. | 500 | 500 | 500 | 657 |
| Kommunalar matrikuleringsútr...... | 135 | 135 | 135 | 68 |
| Valútreiðslur................................ | 50 | 300 | 50 | 172 |
| Grunnurin "Tór-Reyk-Nuuk".......... | 100 | 100 | 100 | 0 |
| Grunnurin "Tórshavn - Aberdeen" | 100 | 100 | 100 | 50 |
| Grunnurin "Tórshavn - Stavanger' | 100 | 100 | 100 | 113 |
| Lýsingar...................................... | 40 | 40 | 0 | 0 |
| Samstarv við Før. kommunur....... | 1.000 | 950 | 700 | 851 |
| Altjóða samstarv.......................... | 200 | 200 | 200 | 309 |
| Vinnuverkætlanir......................... | 1.500 | 1.500 | 0 | 0 |
| Aðrar útreiðslur............................ | 1.265 | 1.200 | 850 | 1.205 |
| Festið á Sundi............................. | 270 | 220 | 220 | 221 |
| Inntøkur av parkeringsskipanini.... | -2.500 | -2.500 | -2.000 | -2.306 |
| Útreiðslur av parkeringsskipanini.. | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.308 |
| **Í alt** | **11.210** | **11.135** | **10.640** | **9.942** |